| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**27. november 2008** | Blað nr.:<br>**7571** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **27. november 2008** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 205/08-228/08**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Vagnur Johannesen
Halla Samuelsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Bjarti Mohr

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Ingibjørg Berg
Jákup Egholm Hansen
Heri Olsen
Eva Bennicke

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**209/08** **2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 27. november 2008:** Tikið til eftirtektar.

**210/08** **2004-0660/8 - SG**

**Nýtt røktarheim við Hoyvíkstjørn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum um eldraøkið, sum arbeiðsbólkur læt landsstýrismanninum í almannamálum í 2002, verður staðfest, at Suðurstreymoy er tað økið, sum yvirhøvur er ringast fyri, tá hugsað verður um tørvsfulnað í mun til búpláss. Bráfeingistørvurin er 37 røktarheimspláss, eftir at ætlaða heimið fyri minnisveik er tikið í nýtslu.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur til ymiskar verkætlanir kring landið játtað slakar 40 mió. kr. av samlaðu játtanini uppá 58 mió. kr. fram til 1. januar 2005, tá eldraøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita og fíggja, bæði tá talan er um íløgur og rakstur. Sostatt eru 18 mió. kr. eftir av játtanini, sum væntandi verða býttar út í heyst eftir tá fyriliggjandi umsóknum og verkætlanum.

Landsstýrismaðurin hevur alment boðað frá, at tað eru kommunurnar sjálvar, sum mugu taka stig til verkætlaninar.

Tá kommunan keypti gomlu marinustøðina, var samstundis gjørt av, at bygningurin og økið rundanum burturav var brúkt til frama fyri tey gomlu í kommununi.

Umsitingin hevur latið kannað, um møguligt er at byggja eitt røktarheim á økinum. Mett verður, at møguleiki skuldi verið fyri at bygt eitt røktarheim á økinum við pláss fyri 24 búfólkum.

Ognin matr. nr. 1056d og 1056e liggur í A1 øki, men sambært plandeildina er økið eisini umfatað av serstøku byggisamtykt nr. 7, sum er útlagt sum E-øki, kannað almennum endamálum. Sambært serstøku byggisamtyktini átti tí einki at verið til hindurs fyri at bygt nýtt røktarheim í økinum, men plandeildin metir tað ikki rætt

at leggja seg fast á nevnda øki, fyrr enn broytingarnar av ásetingunum fyri A1 øki eru góðkendar í Oljumálastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla sosialu nevnd til at taka undir við, at fyrireikingar verða gjørdar til at byggja nýtt røktarheim, og at byggiprogramm verður gjørt.

**Sosiala nevndin 10. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og játta kr. 100.000,00 av konto 40 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiprogrammi.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur, settur av trivnaðarstjóranum, hevur gjørt byggiskrá fyri nýtt røktarheim ætlað 24 búfólkum. Mælt verður til, at røktarheimið verður sambygt við Tjarnargarð, og verður møguleiki tá at gera nýtslu av felagsfasilitetum, so sum ergo- og fysioterapi.

Oljumálastýrið hevur góðkent broytingarnar í almennu byggisamtyktini fyri A1 øki, og skuldi tí onki verið til hindurs fyri, at røktarheimið verður bygt á økinum við Tjarnargarð.

Ásannandi at verandi røktarheimstilboð langt frá nøkta tørvin, verður mælt til, at nýggja heimið verður fyri tey tungu røktarkrevjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at góðkenna hjáløgdu byggiskrá, dagf. des. 2003, og at kr. 300.000,00 verða játtaðar av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av dispositiónsuppskoti, soleiðis at søkjast kann um stuðul frá Almannamálaráðnum sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001 um studningslán til ellis- og røktarheim.

**Sosiala nevndin 17. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og beina málið í býráðið og síðani í tær nevndir, sum samb. mannagongd í sambandi við byggimál eisini skulu viðgera málið.

**Býráðið 29. januar 2004:** Einmælt samtykt at taka undir við sosialu nevnd at gera fyrireikingar til bygging av ellis- og røkarheimi, soleiðis at søkjast kann um stuðul frá Almannaráðnum, sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001, og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og leggja saman matr.nr. 1056e og matr. nr. 1056d, soleiðis at byggjast kunnu 1250 m², vísandi til ásetningarnar fyri økið.

**Tekniska nevnd 2. mars 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum at lata gera parkeringspláss inni á økinum matr.nr. 1056d og at atkoma verður frá Stoffalág.

Eisini mælir nevndin til, at parkeringsplássið inn frá Stoffalág verður til almenna parkering.

**Nýtt:**
Eftir áheitan frá byggideildin hevur Selmar Nielsen, Arkitektur Spf, gjørt dispositiónsuppskot, sum verður lagt fyri nevndina til góðkenningar.

Við einum m² prísi uppá kr. 17.123 verður samlaði kostnaðurin íroknað 6,25% MVG mettur til kr. 26.112.091.

Sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001 um studningslán til ellis- og røktarheim kann væntast, at Almanna- og heilsumálaráðið játtar kr. 12.000.000,- til verkætlanina.

Fyri Tórshavnar kommunu verður kostnaðurin sostatt kr. 14.112.091,-.

Eisini er gjørd ætlan fyri fríðkan av øllum grundøkinum við sambinding til Hoyvíkstjørn og ímóti Hoyvíksvegnum. Kostnaðurin av hesum arbeiði verður mettur til kr. 1.232.500,-.

Selmar Nielsen, arkitektur, verður við á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna dispositiónsuppskotið við tíðarætlan dagfest september 2004. Eisini verður mælt til í sambandi við verkætlanina, at alt grundøkið verður fríðkað og sambundið við Hoyvíkstjørn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

500.000 kr. eru tøkar á konto 40 í 2004 til verkætlanina, so mælt verður til, at 1,5 mió. kr. verða játtaðar av íløguætlanini fyri 2004, 3,6 mió. kr. av íløguætlanini fyri 2005, 6,8 mió. kr. av íløguætlanini 2006 og 3,3 mió. kr. av íløguætlanini fyri 2007.

**Sosiala nevndin 7. september 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og beina málið til teknisku fyrisitingina til liðugtgerð av projekti og útbjóðing.

**Nýtt:**
Arbeiðið at byggja røktarheimið verður boðið út í september 2005. Støða skal takast til útbjóðingarhátt.

Í projekteringsfasuni er komið eftir, at neyðugt er við lyft millum kjallara og stovuhædd, sum kostar kr. 300.000,00. Eisini hava prís- og lønarhækkingar verið, sum eru mettar til kr. 672.000,00.

Samlaði meirkostnaður við 6,25% mvg í mun til upprunaligu kostnaðarmetingina verður sostatt mettur til kr. 1.032.000,00.

Bygginevndin og býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggju kostnaðarmetingina uppá íalt kr. 28.081.364,00 við 6,25% mvg, og at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku í innbodnari licitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Sosiala nevnd 7. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at góðkenna nýggja kostnaðarmeting uppá kr. 28.081.364,00, og at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku millum í minsta lagi 5 arbeiðstakarar.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í høvuðsarbeiðstøku í innbodnari licitatión.

Inn komu 4 tilboð, og var licitatión mánadagin 25. oktober 2005. Úrslitið varð:

| | |
|---|---|
| Sp/f Búsetur | kr. 16.763.275,00 u/mvg |
| Sp/f Valbjørn Dalsgarð & J & K Petersen | kr. 17.264.283,52 u/mvg |
| Sp/f ÁTS v/Karstin Vang | kr. 18.275.550,00 u/mvg |
| P/F Articon | kr. 19.885.128,33 u/mvg |

Ráðgevin Selmar Nielsen Arkitektur S/pf hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum.

Ráðgevin hevur dagført kostnaðarmetingina, so hædd nú er tikin fyri øllum hugsandi útreiðslum í sambandi við liðuggerð av heiminum, fram til klárt er hjá búfólkunum at flyta inn. Nýggja metingin kr. 28.080.163,- er innan fyri játtaða fíggjarkarmin. Tó er í kostnarmetingini ikki tikin hædd fyri møguligum prís- og lønarvøkstri í byggitíðini. Leystliga mett kann roknast við einum prís- og lønarvøkstri uppá 3% ella kr. 845.000,-

Bygginevndin og býararkitekturin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Búsetur og at samráðast við arbeiðstakaran um sáttmála. Eisini verður mælt til at játta kr. 845.000,- eyka til møguligan prís- og lønarvøkstur í byggitíðini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og býararkitektinum og taka av tilboðnum frá Sp/f Búsetur.

Eisini verður mælt til at góðkenna dagførdu kostnaðarmetingina frá november 2005 og at játta kr. 845.000,- eyka til møguligan prís- og lønarvøkstur, soleiðis at samlaða íløgujáttanin verður kr. 28.125.000,-.

**Sosiala nevndin 8. november 2005:** Ein samd nevnd tekur undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum um at taka av tilboðnum frá Sp/f Búsetur.

Ein meirluti, Katrin Dahl Jakobsen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen, samtykti at góðkenna dagførdu kostnaðarmetingina frá november 2005 og mælir býráðnum, um fíggjarnevdina, til at játta kr. 845.000,00 eyka til møguligan prís- og lønarvøkstur í byggitíðini, soleiðis at samlaða íløgujáttanin verður kr. 28.925.000,00.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at projektið verður framt innan fyri kostnaðarmetingina frá 7. juni 2005 á kr. 28.080.163,00.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum frá p.f. Búsetur uppá kr. 16.763.275,00.

Eisini samtykt at játta kr. 16.925.000,00 av íløgum og at leggja út kr. 12.000.000,00 fyri væntað studningslán frá almanna- og heilsumálaráðnum. Samlaði kostnaðurin verður sostatt kr. 28.925.000,00.

Í byggitíðini skal yvirlit yvir fíggjarligu gongdina og tíðarætlanin leggjast fyri borgarstjóran og kommunustjóran 14. hvønn dag.

**Býráðið 24. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi dagfest 24. mai 2006 boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Tórshavnar kommunu endaliga tilsøgn um studningslán á í mesta lagi 12. mió kr., ið er treytað av, at

Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina
Í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.
Harumframt verður víst til treytirnar, sum annars eru ásettar í løgtingslóg nr. 166 frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og sambýli.

**Sosiala nevnd 13. juni 2006:** Kunnað varð um málið.

Í sambandið við avhendanina av Røktarheiminum við Hoyvíkstjørn hava nakrir trupulleikar stungið seg upp millum byggiharran (Tórshavnar kommunu) og høvuðsarbeiðstakaran (P/F Búsetur).

**Dagbøtur/eykadagar**
Arbeiðið var avhendað 56 arbeiðsdagar seinni enn ásett var í sáttmálanum, og tí hevði TK afturhildið kr. 962.080,- fyri dagbøtur (56 dagar á kr. 17.180,-).

Búsetur helt hinvegin fast í, at TK hevði umbiðið so nógv eykaarbeiðir, at teir høvdu rætt til 65 eykadagar, og at arbeiðið sostatt ikki var seinka.

**Indexreguleringar sbr. ABF 92**
Búsetur hevði sent fakturar uppá indexreguleringar fyri tils. kr. 158.231,62 (uttan mvg) fyri tíðina aftaná avhendingardagin sambært sáttmálanum, og hesar hevði TK avvíst at rinda, við tí grundgeving, at ein ikki hevur rætt til at indexregulera, fyri tíðina arbeiðið er seinkað orsaka av arbeiðstakaraávum.

**Prísregulering av jørðarbeiðið**
Nøgdirnar, ið skuldu koyrast til og frá, í sambandið við jørðarbeiðið, vístu seg at verða munandi størri enn mett, og tí metti Búsetur seg hava rætt til at regulera í eindarprísunum fyri meirveitanina. Fyri hesa prísregulering sendi Búsetur ein faktura áljóðandi kr. 298.436,25 (uttan mvg).

TK hevur avvíst hesa rokning vísandi til at %-mørkini samb. § 14, stk. 3, 2. pkt. í ABF 92, skulu roknast í mun til høvuðsarbeiðstøku-upphæddina og ikki bert jørðarbeiðstøkuna.

**Feillevering av vindeygum**
Í sambandið við leveringina av vindeygunum, vísti tað seg, at nøkur teirra ikki vóru nýtilig orsaka av skeivum mátum. Búsetur segði seg ikki kunna taka ábyrgdina av hesum, tí tað lat seg ikki gera út frá tekningunum, at mátseta vindeyguni. Teir høvdu tí í samráð við byggieftirlitið eftir besta førimuni mátsett vindeyguni. Byggieftirlitið hevði góðkent bíleggingina áðrenn hon varð effektuera.

Prísurin fyri nýggj vindeygu við røttu mátunum var 85.693,75 (uttan mvg), sum Búsetur faktureraði víðari til TK.

TK noktaði at gjalda, við tí grundgeving, at arbeiðstakarin sjálvur hevur ábyrgdina av at gera arbeiðstekningar við røttu mátunum, og at hann ikki kann sleppa sær undan sínari professionellu ábyrgd, við at fáa byggiharran at góðkenna eina bílegging.

**Eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við bjálving í innveggjum**
Búsetur hevur sent faktura fyri eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við bjálving í innveggjum uppá kr. 167.256,25 (uttan mvg).

Búsetur vísti á, at bjálvingin ikki var nevnd í bygningslutafrágreiðingini og at bjálvingin heldur ikki var nevnd í teimum veggyvirlitstekningum, sum tilboðslistin og bygningslutafrágreiðingin vísa til.

TK noktaði at gjalda við tí grundgeving, at einhvør professionellur arbeiðstakari veit, at tað sjálvandi skal bjálving í allar innveggir, og tí átti Búsetur at vita hetta, longu tá tilboðið var givið.

**Eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við streymveiting til neyðdyr**
Búsetur hevur sent fakturar fyri eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við streymveiting til neyðdyrnar í røktarheiminum uppá tilsamans kr. 145.498,75 (uttan mvg).

Búsetur vísti millum annað á, at spenningsstøðið ikki var nevnt í útbjóðingartilfarinum, at upplýsingar um el-lutir á neyðdyrnum manglaðu í útbjóðingartilfarinum.

TK noktaði at gjalda við tí grundgeving, at útbjóðingartilfarið var greitt nokk til, at arbeiðstakarin kundi útvega sær allar neyðugar upplýsingar.

**Mótrokning fyri kostnað av at mála allar karmar á vindeygum og hurðum innantil**
Í sambandið við, at málingin var skødd/dottin av nógvastaðni á vindeyga- og hurðakørmunum innantil, bað TK ein málara um at umvæla og mála allar karmarnar. Fyri hetta rindaði TK kr. 92.000,- (uttan mvg).

TK hevur ført fram, at talan er um ein framleiðslufeil ella vindeyguni eru goymd á skeivan hátt, og tí er tað Búsetur, sum má hefta fyri mangulin mótvegis TK.

Búsetur hevur hinvegin ført fram, at tað var óneyðugt at mála allar karmar fullkomuliga av nýggjum. Feilurin hevði kunnað verið rættaður, við at mála tey støðini har málingin var dottin av. Hetta hevði kostað munandi minni.

**Gongdin í málinum**
Av tí at partarnir vóru sera langt frá hvør øðrum, vóru fleiri fundir hildnir og nógvar kanningar gjørdar fyri at finna út av, um møguligt var at finna eina semju, ella um neyðugt fór at verða at fara í gerarættin fyri at fáa loyst málið.

Á fundunum førdu partarnir fram teirra sjónarmið, og funnið varð fram til, hvørji prógv og skjalprógv partarnir ynsktu frá hvør øðrum.

**Viðv. dagbótum/eykadøgum**

Stórsti knúturin í málinum var spurningurin um TK hevði rætt til dagbøtur orsaka av ov seinari avhending, ella um Búsetur hevði rætt til eykadagar orsaka av eykaarbeiðum.

Hendan spurning varð brúkt sera nógv orka uppá. TK kravdi at Búsetur skjalprógvaði hvønn einasta eykadag, teir mettu seg hava rætt til orsaka av eykaarbeiðum. Hesi skjalprógv kom Búsetur við, og TK brúkti síðani nógva orku uppá eina kritiska gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum skjali.

Niðurstøðan hjá TK varð, at skjalprógvini vóru haldgóð, og at Búsetur tískil hevði løgfrøðiligt krav uppá í minsta lagið 56 eykadagar.

**Viðv. indexreguleringum sbr. ABF 92**
Av tí at Búsetur hevði rætt til eykadagar sambært omanfyri, høvdu teir eisini rætt til at indexregulera fram til "nýggja" avhendingardagin.

**Viðv. prísregilering av jørðarbeiðið**
TK helt fast í og skjalprógvaði, at %-mørkini sambært § 14, stk. 3, 2. pkt. í ABF 92, skuldu roknast í mun til høvuðsarbeiðstøku-upphæddina. Hetta valdi Búsetur at enda at góðtaka, og slepti kravinum.

**Viðv. feillevering av vindeygum, eykaarbeiði í sambandið/tilfari við bjálving av innveggum, eykaarbeiði/tilfari í sambandið við streymveiting til neyðdyr og kostnaðin fyri at mála allar karmar**
Hesi fýra punktini vóru partarnir sera ósamdir um. Talan var um nógvar torførar fakligar spurningar, og báðir partar høvdu nógv góð argumentir fyri teirra sjónarmiðum. Samanumtikið metti hvørgin partur, at tað var vert at fara í gerarættin við hesum lutfalsliga smáu upphæddunum, tí kostnaðurin av einum gerarrættarmáli er so stórur.

TK metti seg at hava góð útlit fyri at fáa viðhald fyri sínum sjónarmiðum í nøkrum førum, meðan útlitini í øðrum førum vóru munandi verri. Eftir at hava viga fyri og ímóti, varð mett, at ein semja, har hvør partur átók sær helvtina av kostnaðinum, var góð fyri TK. Serliga um hugsa varð um tær spardu útreiðslurnar til eitt gerarrættarmál.

Partarnir samdust sostatt um, at býta hesar upphæddir soleiðis, at TK rindaði helvtina meðan Búsetur góðskrivaði helvtina. Um semjan verður góðtikin vil meirkostnaðurin fyri TK verða kr. 1.572.000,- við 6,25 % mvg.

**Samanumtikið**
verður mett, at samlaða semjan er til fyrimuns fyri kommununa, og at eitt møguligt gerarættarmál mest sannlíkt fer at geva eitt verri úrslit fyri kommununa. Hetta er í hvussu er galdandi, um havt verður í huga, at vanligt er, at hvør partur kemur at rinda helvtina av kostnaðinum av gerarrættarmálinum.

Deildarleiðaranum á løgdeildini mælir sostatt til at góðtaka semjuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá deildarleiðaranum á løgdeildini og at játta kr. 1.572.000,- av konto 90.

**Sosiala nevnd 18. november 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 1.572.000,- av konto 90.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við sosialu nevnd, at fíggja av konto íløgum av konto 90 til eldraøkið.

**Býráðið 27. november 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnvndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**211/08** **2008-4566 HSE**

**Umsókn um øki til Dansifrøi og stuðul til bygging**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um øki og loyvi til felagsbygging til 2 felags høli til Dansifrøi og Fimleikafelagið Ljósið.

Feløgini vísa á øki í Gundadali, ið er ogn hjá TK, og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j.nr. 200202686-2
Tekningar av skitsuprojekti: j.nr. 200202686-2
Kortskjal av økinum: j.nr. 200202686-3

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Dansifrøi hevur fyrr havt samband við umsitingina, har teir hava søkt um at fáa útvega økið, men hava ikki víst á nakað, sum umsitingin hevur mett verða gongd leið.

Umsitingin hevur havt samráðingar við fimleikafelagið í sambandi við, at teir upprunaliga søktu um einhvørja høll, av tí at teir høvdu stóran hølistørv. Í hesum

sambandi vísti umsitingin tá á, at teir arbeiddu við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki, nú saman við Dansifrøi.

Arkitekturin hevur verið á byggideildini og framlagt verkætlanina fyri býararkitektinum og hevur fingið at vita, at ymisk viðurskiftir uttanfyri, so sum parkering og ferðsla í sambandi við verkætlanina skulu endaliga viðgerast í samráð við umsitingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata umsøkjaranum økið at byggja verkætlanina á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður umsøkjaranum, at skipa soleiðis fyri, at parkering og onnur uttanumviðurskifti verða gjørd í samráð við umsitingina hjá TK.

Endaliga verður gjørt vart við, at endalig umsókn um byggiloyvi skal leggjast fyri nevndina aftur, tá ið allar tekningar og neyðug loyvi fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2003:** Mikael Viderø, býararkitektur, kunnaði nevndina um felagsbygningin hjá Dansifrøi og Fimleikafelagnum Ljósinum.

Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 29. september 2003 treytað av, at ungdómsdansur verður ein partur av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskip-anarnevndini og at taka upp samráðingar um økið.

**Ískoyti:**
Broyting er hend soleiðis, at fimleikafelagið Ljósið er farið úr verkætlanini. Felagið Dansifrøi er komið við broyttari verkætlan.

Nýggjar tekningar eru komnar frá Arkitektavirkinum Magnus Hansen.

Gólvvíddin er 840 $m^2$.

Mesta hædd á bygningi 9,5 m.

Tal av bilstøðlum 40, kravt tal av bilstøðlum 1 stk/50 $m^2$.

Av tí at enn ikki er avgjørt um grundøkið skal frámatrikulerast, ber ikki til at rokna byggistig ella nettonýtslustig.

Bygningurin liggur í økispartinum D2 ítróttarøki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at broytta verkætlanin verður góðkend, og at umsóknin um byggiloyvi verður gingin á møti. Samstundis verður mælt til, at fíggjarnevndin viðger nýggju fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at góðkenna broyttu verkætlanina og at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti.

Samstundis verður spurningurin um tær nýggju fíggjarligu fyritreytirnar beindur í viðkomandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Umrøtt og verður tikið uppaftur, tá mentamálanevndin hevur viðgjørt málið.

**Nýggj umsókn um stuðul**.

**Á fundi í mentamálanevndini 10. februar 2004** samtykti nevndin at játta 30% av kr. 16.500.000,00, sum býráðið á fundi 19. februar 2004 samtykti at taka undir við mentamálanevndini, sum sostatt fellur burtur nú nýggj umsókn er komin.

- Í nýggju umsókníni, dagfest 11. juli 2005, er kostnaðarmetingin kr. 7.600.000,00 tilsamans uttan MVG ella kr. 9.500.000,00 við MVG, og søkir Dansifrøi um øktan stuðul frá teimum 30% til 60% fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki beinanvegin.

Við 30% kr. 2.850.000,00 og 60% kr. 5.700.000,00.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta 60% av kr. 9.500.000,00 svarandi til kr. 5.700.000,00 í stuðli av konto 64, og at leggja málið fyri býráðið, um fíggjarnevdina, til góðkenningar.

Eisini samtykt at heita á umsitingina um at gera avtalu um nýtslurætt til hølini til m.a. ungdómsdans og leggja avtaluna fyri nevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Málið var umrøtt og samtykt í prinsippinum at taka undir við mentamálanevndini at veita 60% í stuðli, nú landið ikki stuðlar, við nærri treytum og at leggja málið fyri á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at stuðla hallarbyggingina við 5,7 mió. kr. yvir 5 ár við trygd í ognini og avtalu um nýtslurætt og at leggja málið fyri mentamálanevndina og býráðið.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við uppskotinum um avtalu millum Tórshavnar kommunu og Dansifrøi um nýtslurætt til felagshúsið, j. nr. 2002-2686.

**Ískoyti:**
Í sambandi við býarskipanararbeiðið, sum fer fram av økinum í og kring Gundadal, vísandi til nógvu verkætlanirnar, sum bæði kommunan og felagsskapir hava staðsett í økinum, hevur umsitingin mett um staðsetingina av bygninginum hjá Dansifrøði.

Tá nevndin seinast viðgjørdi málið, í samband við prinsipiella tilsøgn um byggiloyvi, vóru munandi øðrvísi fortreytir at leggja til grund fyri støðutakanini til staðseting í mun til aðrar byggingar í økinum. Her er tað serstakliga núverandi verkætlanin hjá grunninum Tórsvølli sum hevur við sær, at tað ikki kann metast ráðiligt at staðseta bygningina hjá Dansifrøði har sum upprunaliga skotið upp. Tættleikin millum báðar verkætlanirnar má metast at vera ov stórur, og kemur at treingja óneyðugt samanum.
Vísandi til at Tórshavnar kommuna eisini fer undir eina víðkan av høllini á Hálsi og atlitið til at Gundadalshøllin hevur framíhjárætt til lendi at víðka móti ætlaðu staðsetingini til Dansifrøði, má metast at økið fer at gerast ov trongt.

Umsitingin hevur tískil víst á aðra staðseting til bygningina hjá Dansifrøði. Sí kortskjal dagfest. 22.02.2007.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta bygningina hjá Dansifrøði sambært kortskjali dagfest. 22.02.2007, vísandi til at hetta er sera hóskandi øki, har verkætlanin vil kunna stuðla væl undir virkseminum og parkeringviðurskiftunum í sambandi við høllina á Hálsi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 22. februar 2007:** Málið útsett.

**Uppískoyti:**
Skriv er komið frá felagnum, har teir vísa at teir eru glaðir fyri staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 2. apríl 2007:** Ein meiriluti Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen og Leivur Hansen mælir til at halda fast við upprunaligu staðsetingini av felagshúsi og varðveita geiran millum Ítróttarhøllina og R.C.Effersøesgøtu sum eitt grønt øki.

Harumframt samtykti nevndin at leggja avgerðina fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Katrin Dahl Jakobsen, um at beina málið aftur í byggi og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, og Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen.

**Ískoyti:**
Dansifrøi hevur fingið byggiloyvi, dagfest 13. 12. 2007, journal nr. 2007-3092/44, og var arbeiðið byrjað. Tá bygningurin var liðugt stoyptur var staðfest, at bygt var ikki sambært byggiloyvinum, tí innrættingin var speglvend.

Arbeiðið var steðgað, og umsøkjarin er nú komin við nýggjari umsókn, sum er í samsvari við byggiloyvið, men nakað broytt. Tí er málið viðgjørt av nýggjum, og sent til teknisku deild hjá TK, og til Brunaumsjón Landsins.

**Viðmerkingar:**
Notat frá teknu deild liggur í málinum (j.nr. 2007-3092/48).

Samanumtikið er tekningstilfarið ikki egnað til viðgerð hjá teknisku fyrisitingini.

Tá greiðar, mátsettar tekningar, eisini í mun til matrikulmark og grannabygningar og herundir Tórsvøll, fyriliggja, ynskir tekniska fyrisitingin at viðgerða hesar.

Viðmerkingar frá Brunaumsjón Landsins eru ikki komnar.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar frá teknisku deild, og málsgongdina annars í málinum, har umsitingin í fleiri umførum hevur havt fund við umsøkjaran um loysn í málinum, og har umsitingin nágreiniliga hevur útgreinað krøv til, og umbiðið sær nøktandi tekningstilfar, mælir býararkitekturin til at nevndin heitir á umsøkjaran um at leita sær nøktandi ráðgeving og at venda aftur við nøktandi tekningstilfar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. oktober 2008:** Nevndin samtykti at ganga tí nýggju umsóknini á møti við treytum, sum umsitingin setur.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðkenna uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**212/08** **<u>2008-4491</u>**

**<u>Øki til til eina nýggja hondbóltshøll til hondbóltsfelagið Neistan</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umboð fyri Neistan møta á fundinum.

Málið er ikki viðgjørt í umsitingini.

**Mentamálanevndin 12. apríl 2002:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá hondbóltsfelagnum Neistanum, har søkt verður um at sleppa at fáa økið at byggja eina hondbóltshøll á.

Felagið vísir á økið í Marknagili, - matr. nr. 917, ið er ogn hjá TK og liggur, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:

| | |
|---|---|
| Umsókn frá umsøkjaranum: | j. nr. 2002-1012 |
| Kortskjal av økinum: | j. nr. 2002-1012 |

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Neistan í sambandi við at teir upprunaliga søktu um at sleppa at byggja høllina á Frælsinum.

Hesum noktaði umsitingin fyri og vísti tá á, at umsitingin arbeiddi við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata Neistanum økið, matr. nr. 917, at byggja eina hondbóltshøll á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður Neistanum at skipa soleiðis fyri, at høllin møguliga kann útbyggjast til eina dupulthøll.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við ætlanini at lata Neistan byggja eina hondbóltshøll á part av matr. nr. 917, og at restina av økinum verður avlagt til eina møguliga høll aftur at.

Eisini samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**2002-1012**
**Umsókn um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917, við Landavegin í Tórshavn.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Hondbóltsfelagið Neistin søkir um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917 við Landavegin í Tórshavn.

Útgangsstøðið fyri høllina er at gera eina høll, sum í støðd tekur støði í støddini á einum hondbóltsvølli, sum lýkur altjóða krøv til innandura hondbóltsvallir viðv. hædd, vídd og umstøðum til leikarar dómarar og áskoðarar.

Góðar umstøður verða til tey rørslutarnaði.

Bygningurin kann býtast upp í sjálvan hallarbygningi, og ein síðubygning, sum partvís er í tveimum hæddum. Samlaða víddin á bygninginum verður 2.945,4m².

Tað verða pláss fyri í alt 910 áskoðarum, harav tey 680 verða sitipláss.

Útveggir og tekjan verða klædd við profileraðum aluminiumsplátum. Vindeygu og úthurðar verða úr aluminium.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti D2 ítróttarøki, og er umsóknin viðgjørd eftir almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 917, er 16.843 m² til víddar.
Byggistigið verður 0.17. Mest loyvda byggistig er 0.25.
Nettonýtslustigið verður 0.24. Mest loyda nettonýtslustig er 0.3.
Tal av bilstøðlum fult útbygt 273. Kravt tal av bilstøðlum 4117,4 / 50 = 82.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Fíggjarnevndin hevur samtykt á fundi 15. mars 2006 at játta kr. 7.250.000,- yvir 5 ár.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2002-1012.
Støðumynd í mát 1:1000.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini at ganga umsóknini á møti, at senda málið til grannakunningar, og at útskriva byggiloyvi, tá aðrir myndugleikar, ið hava heimild at seta krøv, hava góðkent byggingina. Samstundis at beina málið í teknisku nevnd, í sambandi við ætlaða vegin fram við vestara markinum, sum skal samanbinda Landavegin og Marknagilsvegin, umframt eitt møguligt busssteðgipláss í sambandi við høllina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu av lendisspurninginum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leiga Neistanum hóskandi/neyðugt lendi av matr. nr. 917 til bygging av ítróttarhøll við neyðugum uttanum øki til parkering v.m. við somu treytum og leiguupphædd sum aðrir ítróttarbygningar.

Tilsøgnin um leigu er treytað av, at byggingin er byrjað innan 2 ár.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðkenna uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen..

**213/08** **2008-1137**

**Umsókn frá felagnum Føroysk Ross, um øki, har felagið kann seta upp fjós og hava skipaðar umstøður fyri rossunum.**

Anna Louisa Joensen: Umsókn um brúksrætt til økið norðan fyri gøtuna niðan til Tølthøllina burtur av Flatnahaga, tað ið verður nevnt Lítlafjall
2008-1137/10 SG

Umboð fyri umsøkjaran koma inn at greiða frá málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16.juni 2008:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Nýggj staðseting er gjørd til øki til Føroysk Ross, vísandi til fundin tann 16. juni 2008.

Flatnahagi er ogn hjá Tórshavnar kommunu og liggur sum 4. grundumráði í byggisamtyktini

Økið er uml. 27.700 m til víddar burtur av Flatnahaga matr. nr. 1160a, norðanvert Tvøránna og Kráarheyggj, sí hjálagda kortuppdrátt av økinum.

Leigarin ella brúkarin av Flatnahaga, Júst Rubeksen, skal hava fráboðan um broytingina, og sáttmálin við hann lagast til nýggju viðurskiftini.

Atkomuvegur er eftir trønni hjá fyrr Jákupi á Dul sála, sum nú er lutað sundur í traðarbrúk og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Býarargartnarin mælir til at staðseta økið her, og at løgdeildin skipar fyri avtalu um brúksrættindi við Føroysk Ross.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, og at gera uppskot til leigusáttmála at leggja fyri fíggjarnevndina á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Føroysk Ross. Av tí, at ætlanin hjá umsøkjaranum er at byggja bygning á leigaða økinum verður mett, at leigumálið má ganga yvir 25 ár.

Hetta letur seg bert gera, um økið, ið ætlanin er at leiga umsøkjaranum, verður frábýtt, tí sambært matrikullógini er ikki loyvt at lata øðrum til brúks partar av einum føstum eigindómi longur enn 10 ár.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini til at góðkenna fyriliggjandi leigusáttmála og taka undir við, at økið, ið ætlanin er at leiga umsøkjaranum, verður frábýtt matr. nr. 1160a, Tórshavn og fær sjálvstøðugt matr. nr.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til 25 ára leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**214/08** **<u>2002-0790</u>**

**<u>Valbjørn Dalsgarð: Umsókn um byggiloyvi til 6 randarhús á matr. nr. 42a, Argir</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Valbjørn Dalsgaard hevur í skrivi, dagf. 15. mars 2002, søkt um loyvi at byggja randarhús á matr. nr. 42<u>a</u>, Argir (Revatrøðin), og hevur í skrivi, dagf. 10. juli 2002, frá umsitingini fingið upplýst, at umsóknin um byggiloyvi ikki kann viðgerast vísandi til, at Hóvabrekka ikki er kommunalur vegur, og at atkomuviðurskiftini til omanfyri nevnda matrikul eru ógreið.

Valbjørn Dalsgaard hevur sett seg í samband við eigaran av matr. nr. 56 <u>ca</u>, sum er Føroya landsstýri (almanna- og heilsumálaráðið og mentamálaráðið). Ráðini hava sett seg í samband við Landsverkfrøðingsstovnin fyri at fáa eina tekniska meting av málinum, og í skrivi, dagf. 11. mars 2004, frá Landsverkfrøðingsstovninum verður mælt frá at økja um nýtsluna á Hóvabrekku, vísandi til hallið á brekkuni og útsýnið móti Reynsgøtu.

Hóvabrekka er ikki gjørd sambært teimum teknisku ásetingunum, ið eru galdandi í dag, og vildi tískil ikki verið góðtikin sum atkomuvegur. Men við tað at Argja kommuna í síni tíð hevu latið gera slíkar atkomuvegir, sum ongantíð eru yvirtiknir, og at hesir hava verið nýttir í mong ár, er neyðugt hjá teknisku nevndini at taka støðu til atkomuviðurskifti á Hóvabrekku, og um kommunan skal yvirtaka Hóvabrekku – hetta í sambandi við fyriliggjandi umsókn frá Valbjørn Dalsgaard.

**Tilmæli:**
Tað fer ikki at bera til at broyta hallið á Hóvabrekku, og tað verður trupult at betra um útsýnisviðurskiftin frá Hóvabrekku út móti Reynsgøtu. Men við tað at talan er um eitt íbúðarøki, og at Hóvabrekka verður beinkað og at gjørd verður gongubreyt, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti frá Valbjørn Dalsgaard at gera Hóvabrekku - tó við teirri broyting, at útsýnisviðurskiftini verða broytt samsvarandi uppskoti frá umsitingini

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin er sinnað at loyva atkomu eftir Hóvabrekku til bygging á matr. nr. 42a treytað av,

<u>at</u> vegurin verður gjørdur 6 m breiður, umframt gongubreyt á aðrari síðuni.
<u>at</u> útsýnið út á Traðagøtu verður betrað.
<u>at</u> umsøkjarin fær eina avtalu við eigaran av ognini á matr. nr. 42b, har vegurin skal gerast.
<u>at</u> vegurin annars lýkur tær treytir, sum kommunan setir til kommunalar vegir.
<u>at</u> projekt verður lagt fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Ískoyti:**

Valbjørn Dalsgaard hevur havt samráðingar við almanna- og heilsumálaráðið um nýtslurætt á Hóvabrekku í sambandi við ætlan hansara um at byggja á matr. nr. 42a, Argir (eigari: sp/f Valbjørn Dalsgaard).

Hann hevur víst á, at almanna- og heilsumálaráðið hevur sett sum treyt, at eingin ferðslurættur skal verða til matr. nr. 41a, Argir (eigari: Marita Blástein v.fl). Henda ognin hevur bert atkomumøguleika til Hóvabrekku, tí tað fer at verða trupult at gera atkomuveg oman í Traðargøtu vegna vánaligt útsýni og plásstrot millum verandi ognirnar, matr. nr. 41b og 42h, Argir.

Umsitingin er av teirri áskoðan, at treytirnar, sum almanna- og heilsumálaráðið nú ætlar at seta, ikki eru í samsvari við heildarætlanina á økinum, sum Argja kommuna á sinni hevur latið gera.

Ynski er, at nevndin tekur støðu til, um kommunan skal halda fast við, at ognin matr. nr. 41a, Argir, skal hava atkomurætt frá Hóvabrekku ella ikki.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at nevndin heldur fast við, at ognin matr. nr. 41a, Argir, skal hava atkomurætt frá Hóvabrekku og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til endaliga staðfesting.

**Tekniska nevnd 14. desember 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og heitir á nevndina um reisa málið um yvirtøku av Hóvábrekku og beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at kommunan ognar sær lendið undir Hóvabrekku og at beina málið í fíggjarnevndina at taka støðu til gjald fyri íbinding v.m. hjá umsøkjaranum.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um at kommunan ognar sær Hóvabrekku.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Hóvabrekka sambært uppskoti um avtalu við eigaran.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Hóvabrekka sambært uppskoti um avtalu við eigaran.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Tekniski stjórin gjøgnumgekk uppskot til avtalu.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. januar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Í sambandi við samráðingar við eigararnar av Hóvabrekku, eru ymisk viðurskfti, ið Landsverk hevur kravt, sum kunnað verður um.

**Tekniska nevnd 21. august 2008:** Kunnað varð um málið.

- Umsitingin leggur fram uppskot uv vegaføring, sum Landsverk kann taka undir við. Tekniska nevndin skal taka støðu til uppskot nr. 2.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til verkætlanina. Metti kostnaðurin fyri sjálvt vegarbeiðið er uml. 1,5 - 2,0 mió. svarandi til ein meturprís álj. kr. 15.000,-. Tá eru útreiðslur fyri lendi ikki íroknað.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við at detailprojektera, og at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Vísandi til umfatandi krøvini frá Landsverki fyri at yvirtaka vegin, samtykti nevndin at heita á býráðið um at kæra málið til Føroya landsstýri.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

**215/08** **2007-1275 TÌH**

<u>**Gøtuætlan - Dalurin langi í Hoyvík**</u>

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Sambært ætlan fyri Hoyvíkshagi Suður, er Dalurin Langi lagt av til fríøki fyri býarpartin. Ein høvuðsgøta í dalin skal:

Verða ein ferðslutrygg leið í Hoyvíkshaga Suður.
Binda býlingar, stovnar og handilsøki saman.
Hava samband við verandi gøtu kervi.

Karlamagnussarbreyt fer næstu árini at verða merkt av byggivirksemi. Í tí sambandi metir umsitingin at longu nú er tørvur fyri einari tryggari gonguleið í HHS sum fyribils alternativ til Karlamagnussarbreyt.

**Ískoyti:**
Gøtan er tilsamans 1000 m long íroknað samband millum høvuðsgøtu og útstykkingar.
Gøtan verður 2 m breið, soleiðis at minni arbeiðsakfør heva atgongd til vegin í samband við kavarudding v.m. Av tí at talan er um eina høvuðsgøtu, eigur ljós at setast upp fram við gøtuna.

Útreiðslur til gøtuna: 1200 kr. x 1000 m. 1.200.000 kr.
Útreiðslur til 20 lampur inkl. fundament, kaðal v.m.: 200.000 kr.

Samlaðu útreiðslurnar til gøtuna verður tá 1.400.000 kr u.mvg. svarandi til 1.487.500 kr.

Samlaðu útreiðslurnar til gøtuna verður tá 1.400.000 kr u.mvg. svarandi til 1.487.500 kr.

**Tilmæli:**
Byárarkitektin og tekniski stjórin mæla til at taka undir við uppskotinum og játta 1.487.500 kr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

**7. oktober var lisitatión** á lendisdeildini, lægsta boð hevði felagið Sp/f Hjálpirót, ið bjóðar at gera arbeiðið fyri 368.800 kr., hægsta boð var upp á 1.436.279 kr. Biðið verður um at tikið verður við hesum tilboði, umframt keypi, koyring av tilfari og 10% óvæntaða útreiðslur tilsamans kr. 450.000-, tilsamans kr. 818.000,- og at roknskapardeildin ávísir kontonr. á íløgukontoini

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mæli til at taka av tilboðnum hjá Sp/f Hjálpirót, áljóðandi **kr. 818.000 kr** uttan mvg, og at beina málið til býráðið umvegis fíggjarnevndina til støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. oktober 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

216/08 **2007-1213 - BM**

**Rottangaplássið**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Leiðarin á kommunalu brennistøðini greiðir frá málinum um rottangaplássið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. apríl 2007:** Kunnað varð um málið, og notat j. nr. 2007-1213/2 varð lisið upp.

- Sum greitt varð frá um málið á seinasta fundi, og sum framgongur av notati j.nr. 2007-1213/2, er tørvur á einhvørjari skjótari loysn fyri at loysa trupulleikarnar á rottangaplássinum, um rottangatømingin skal halda fram.

**Tilmæli:**
Leiðarin á KB mælir til, at farið verður undir at gera neyðugar fyrireikingar til at etablera nýtt framkomið rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi, og at fígging verður avsett av íløgum. Nýtt rottangapláss skal helst verða liðugt innan 1-2 ár.
Samstundis mugu fyribils tiltøk fremjast á verandi rottangaplássið við t.d. tangum til rottangaevjuna. Mælt verður til at innkeyp av 1-2 tangum verður fíggjað av rakstri, og at innkeyp av fleiri tangum komandi ár verður fíggjað av íløgum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinumm hjá leiðaranum á kommunalu brennistøðini.

**Ískoyti:**
KB fekk tilboð uppá tanga til rottangaevju um mánaðarskifti juni/juli, og bílegging uppá 1 tanga til rottangaevju varð gjørd seinast í august. Tangin er tó ikki komin til landið enn. Síðani er tilboð upp á fundament eisini fingið til vega.
Samlaði kostnaðurin fyri tangaloysnina gerst væl hægri enn upprunaliga mett. Kostnaðurin fyri ein tanga, íroknað flutning, fundament, uppseting, 10% ókent og mvg verður á leið kr. 640.000 í mun til metingina á kr. 300.000.
Hesin kostnaður fyri ein goymslutanga (kr. 640.000) verður fíggjaður av rakstri í ár (2007).
Í 2008 eru avsettar kr. 2.000.000 til rottangatøming. Harav var ætlanin at gera avtalu við IRF um tøming av 2000 rottangum á kr 310 pr. stk. Og nýta restina av teimum kr. 2.000.000 til goymslutangar. Um IRF skal tøma 2000 rottangar, er fíggjarligt rúm fyri 2 goymslutangum, meðan upprunaliga málið var at fáa til vega 6 goymslutangar, fyri at nøkta tørvin.

Av tí at evjan framvegis er rættiliga bleyt, hóast hon hevur ligið á plássinum eina tíð, er tað bráðneyðugt at gera ein verjugarð í eystara borði á rottangaøkinum, fyri at fyribyrgja, at evja skolar oman av plássinum. Hesin verjugarður átti upprunaliga at vera, sambært góðkenningini, men er ikki har, helst er hann spardur burtur. Kostnaðurin av at gera ein tílíkan garð er kr. 0,9 mió.

Skipað rottangatøming varð sett í gongd á heysti í 2006 og á vári 2007 vóru umleið helvtin av rottangunum (umleið 2000) í Tórshavnar kommunu tømdir. Tá mátti tømingin halda uppat, tí umstøður vóru ikki til at handfara meiri evju. Av tí sama mátti evjan frá umleið 300 tangum avskipast á pláss hjá IRF, og hevur Tórshavnar kommuna bundið seg til at taka ímóti somu nøgd aftur frá IRF. Síðani várið 2007 eru tí einans gjørdar bárðfeingis tangatømingar, umframt tøming av reinsiverkum.

Leiðarin á KB metir tað ikki vera vera forsvarligt at seta gongd á aftur skipaða rottangatøming fyrr enn fysisku umstøðurnar á móttøkuplássinum eru nøktandi, tí evjan kann ikki handfarast og goymast trygt undir núverandi umstøðum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:
1. At verjugarður verður gjørdur beinanvegin og fígging áljóðandi kr. 0,9 mió. fingin til vega av íløgum fyri 2008 (víst verður til skjal nr. 2007-1213/5)
2. At taka støðu til innkeyp av fleiri goymslutangum, tá ið royndir við fyrsta tanganum fyriliggja
3. At uppraðfesta nýtt framkomið rottangapláss, ið skal vera undir taki í grótbrotinum á Glyvursnesi, so tað kann vera liðugt um 1 ár.
   Mett verður, at kostnaðurin fyri projektering verður uml. 0,5 mió.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. desember 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunala Brennistøðin hevur biðið um undirhondsboð frá J&K Petersen og Articon uppá at gera arbeiðið. Articon átti lægri boðið á kr. 694.300 u/MVG. Við 10% ókendum, 12 % ráðgeving og eftirlit, og 6,25 % MVg kemur arbeiðið í alt at kosta kr. 899.986.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:
1. At taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 694.300 og játta kr. 0,9 mió. av íløgum fyri 2008 (av karminum til nýtt tyvingarpláss á Glyvursnesi) til verjugarð á rottangaplássinum í Húsahaganum.
2. At játta kr. 0,5 mió. av íløgum fyri 2008 (karminum til nýtt tyrvingarpláss á Glyvursnesi) til at projektera nýtt rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og leiðaranum á kommunalu brennistøðini og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiði at gera projektuppskot til nýtt rottangapláss (goymsluhøll til rottangaevju) á Glyvursnesi, gjørdist greitt, at ein tílík høll gerst rættiliga kostnaðarmikil. Tí avgjørdi byggibólkurin, at steðga á við at projekera høllina, og heldur kanna eftir, hvørjar aðrar loysnir verða nýttar aðrastaðni og sum eisini kunnu nýtast hjá okkum.
Samband varð tikið upp við Simon Moos Maskinfabrik A/S, ið er hevur serkunnleika í at menna og framleiða skipanir til handfaring av evju. Simon Moos skeyt í fyrstu atløgu upp eina skipan, ið nýtir avlopsorku frá Brennistøðini til at turka og hygiejnisera evjuna.
Umboð fyri Brennistøðina og umboð fyri ráðgevafyritøkuna Martin E. Leo hava verið á kunningarferð hjá Simon Moos og hugt nærri eftir hesi skipan, sum er í rakstri á Morsø. Í fyrstu atløgu sýnist ein slík skipan rættiliga áhugaverd, tó at neyðugt er við fleiri kanningum, áðrenn endalig støða kann takast.

<u>Fyrimunir:</u>
- Íløgukostnaður er helst væl lægri enn fyri eina goymsluhøll
- Óneyðugt við plássi í Húsahaganum/Glyvursnesi til rottangaevjuviðgerð.
- Rottangabilarnir sleppa undan at koyra niðan í Húsahaga/Glyvursnes at tøma. Hetta sparir tíð eins og spilltíð vegna kava og frost minkar.
- Lidna produktið (turkaða evjan) er nýtiligt til taðing, í mun til tað produktið, ið fæst við núverandi skipan, ið framvegis ikki er annað enn trupult burturkast, ið eingin vil vita av.
- Ókeypis orka fæst frá Brennistøðini til turking.
- Nytta fæst úr orkuni á Brennistøðini, sum annars verður køld burtur í konditioneringstorninum í filtrinum, harvið økist samlaða nyttustigið av orkuni úr burturkastinum.
- Ein trupulleiki við rakstrinum av roykreinsifiltrinum á Brennistøðini, ið kemst av at roykhitin aftaná ketilin og inn til filtrið er ov høgur, kann verða loystur við at taka orkuna til turkingina út millum ketilin og filtrið, og harvið køla um roykhitan til filtrið.
- Lidna produktið fyllir munandi minni enn við núverandi skipan, harvið minkar arbeiðið við at handfara lidna produktið eftirfylgjandi eins og plásstørvur til útleggin gerst minni.

<u>Vansar:</u>
- Arbeiðsorka skal til at reka og viðlíkahalda eitt tílíkt annlegg, og tí verður helst neyðugt at seta eitt fólk (handverkara) burturav til tað.
- Skipanin krevur elorku til at flyta evjuna fram gjøgnum skipanina
- Útreiðslur verða til eykalutir.
- Móttøkuumstøður til rottangaevju mugu gerast við síðuna av Brennistøðini á Hjalla (inni á økinum). Her verður hugsað um atkomuveg, móttøkuhøll, goymslutanga og vaskipláss.

Synergieffektir:
Tað at hava eitt slíkt turkiannlegg í samband við eina Brennistøð, ið hevur avlopsorku, gevur fleiri einastandandi møguleikar, fyri at fáa ein skilagóðan rakstur av annleggunum báðum. Nevnast kann:

- Luftin, ið hevur verið gjøgnum turkiannleggið (og sum luktar), kann nýtast sum forbrenningsluft til ovnin, harvið slepst undan at reinsa hesa luft, sum annars er rættiliga kostnaðarmikið (eins dýrt og turkiannleggið).
- Starvsfólk, ið verða sett til at passa eitt slíkt annlegg, kann nýtast til aðrar arbeiðsuppgávur á Brennistøðini, og eisini luttaka í vaktarskipan, tá serligur tørvur er vegna sjúku, summarfrítíð o.t.
- Eitt tílíkt annlegg skal koyra alt samdøgrið, eins og Brennistøðin eisini er mannað alt samdøgrið, og tí er fólk tøkt til at passa tað aftaná vanliga arbeiðstíð.

Avtalað er við Simon Moos Maskinfabrik A/S, at tey senda Tórshavnar kommunu eitt upplegg og eina kostnaðarmeting av eini slíkari skipan síðst í viku 44.

Á fundininum í heilsu og umhvørvisnevndini verður tøka tilfarið um skipanina lagt fram.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin, og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

1. At góðkenna, at arbeitt verður víðari við umrøddu loysn við at turka evjuna í staðin fyri at byggja eina goymsluhøll á Glyvursnesi.
2. At játta 3,6 mió., ið er eftir av íløgukarminum til renovatión í 2008, til hesa ætlan, tó so, at endaligt projekt verður at leggja fyri nevndina aftur, áðrenn nakað arbeiði kann fara í gongd.
3. At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndini við atliti at játtanunum (pkt. 2 og 3).

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin leggja fram uppskot til fígging.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin leggja fram uppskot til fígging. Samlaða verkætlanin, íroknað bygning, varmavekslara o.a. er mett til kr. 7,0 mió. Tá er

roknað við keyp av brúktum anleggi til turkiprosessina fyri uml. hálvan prís. Sum nú er lúkur kommunan ikki krøvini í umhvørvislóggávuni um árliga rottangatøming. Klárgering av móttøkuni er mett at takað uml. 8-9 mánaðir.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til:

1. At taka undir við pkt. 1 og 3 í samtyktini hjá heilsu- og umhvørvisnevndini 4. nov. 2008.
2. At taka undir við at flyta avlopspening av prosjektunum 1015-90-15013 Tyrvingarpláss útbygging og 1015-90-15015 Verjugarður rottangapláss, tilsamans kr. 1.060.860, til prosjekt nr. 1015-90-15015 Nýtt rottangapláss, at leggja afturat verandi saldo á kr. 440.136,-. Víst verður til skjal 2007-1213/25.
3. At játtað kr. 5.500.000,- av íløgum fyri 2009 til verkætlanina. Víst verður til skjal 2007-1213/25.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Eisini samtykt at broyta íløguætlanina í fíggjarætlanini fyri 2009 samsvarandi.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**217/08** **2007-0065 TÌH**

**Bygningur og pláss at húsa lendisdeildini**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Lendisdeildin fevnir um 15 arbeiðsfólk, ið húsast ymsa staðni í býnum við øllum arbeiðstólum, bilum, maskinum, goymslum og tilfari.

- Røktarleiðarin á gl. brandstøðini í Varðagøtu.
- Gartnararnir í gomlu WC'num á Frúutrøð
- Hegn- og timburdeildin og aktingarmaðurin í goymslubygningi hjá Brennistøðini á Sandvíkarhjalla.
- Tvey arbeiðsfólk í húsi í viðarlundini í Gundadali.

- Gravarnir í nýggjum húsi á kirkjugarðinum við Velbastaðvegin.

Mett verður at best er, at øll deildin er undir sama takið, kirkjugarðurin tó partvís.

Fyri ári síðan varð deildin koyrd út úr Íshúsinum á Argjum, har sum goymsla, verkstaður, útipláss til mold, sand, skerv, kompost, greinar o.m.a., umframt mannskapsrúm vóru.

Har vóru sergoymslur til rottueitur, goymslur til beinkir, verkstað og umstøður til at umvæla beinkir, stik- og stikugoymsla, viðfestivognar og djóraflutningsútgerð, kassar v.m. Umstøðurnar nú eru vánaligar og lúka neyvan krøv frá eftirlitsmyndugleikunum.

Røktarleiðarin, ið er dagligur umsitingarleiðari hevur gjørt plásstørvslýsing uppá uml. 600 m² .

Býararkitekturin hevur í samráð við teknisku deild mælt til at bygt verður í grótbrotinum á Oyggjarvegnum, vestanfyri verandi brandstøð, upp ímóti grótbeninum vestureftir. Sí hjálagda kortavrit.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við ætlanini at byggja og at byggiprogram verður gjørt sambært plásstørvslýsing, og at peningur verður útvegaður til ætlanina av løgum fyri verandi fíggjarár 2007.

**Ískoyti:**
Skotið verður upp at gera høll, nakað sama slag sum høllin hjá "Kongavarða" á Argjum, (35,6x17,6) m, kostnaðarmeting 2,5 mill, íroknað innrætting, bjálving, hita.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út at veita og uppseta slíka standard høll sum heildarveiting, og at peningur verður útvegaður til ætlanina av løgum fyri verandi fíggjarár 2007.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og játta 2,5 mill. av konto fyri íløgur.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin koma við uppskoti til fígging til fundin.

Í 2006 varð lendisdeildin koyrd út úr Íshúsinum á Argjum, har sum goymsla, verkstaður, útipláss til mold, sand, skerv, kompost, greinar o.m.a., umframt mannskapsrúm vóru.

Har vóru sergoymslur til rottueitur, goymslur til beinkir, verkstað og umstøður til at umvæla beinkir, stik- og stikugoymsla, viðfestivognar og djóraflutningsútgerð, kassar v.m.

Nøkur starvsfólk hava eina tíð hildi til á Brennistøðini, men vóru nýliga noydd at fara út haðani, av tí at Brennistøðin skuldi nýta hølini.

Lendisdeildin er nú spjadd í tilvildarligum hølum kring býin, og nógv útgerð stendur uttandurað árið runt. Onnur nýggj útgerð verður ikki keypt, av tí at umstøður eru ikki at goyma hesa. Umstøðurnar hjá Lendisdeildini eru sera vánaligar.

Umsitingin hevur kannað ymsar møguleikar – m.a. at keypa onkra brúkta høll at flyta og seta uppaftur í Tórshavn. Niðurstøðan varð, at hetta loysti seg ikki. Samstundis kann eisini staðfestast, at kommunan tørvar goymsluhøli til ymiska útgerð, sum í dag verður goymd ymsastaðni – m.a. í tunnlunum aftanfyri brandstøðina – har hon ferst illa orsakað av fukt o.ø.

P/F á Hálsi hevur boði goymslubygningin á matr. nr. 1326m til sølu. Talan er um goymslubygning á uml. 700 fermetrar, við møguleika fyri at leggja eitt dekk inn afturat í parti av bygninginum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til, at játtaðar verða kr. 7,0 mió. ið verða fíggjaðar av rakstri í 2008 sambært niðarfyri standandi, at byggja nýggja høll á uml. 1000 fermetrar á lendi, sum kommunan eigur.

| | | |
|---|---|---|
| 01 | miðfyrisitingin | 500.000 |
| 02 | trivnaðarfyrisitingin | 500.000 |
| 03 | tekniska fyrisiting | 1.200.000 |
| 11 | Vegir, gøtur v.m. | 2.000.000 |
| 14 | Vatnveiting & gøtuljós | 300.000 |
| 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | 500.000 |
| 38 | Fríðkan av býnum | 2.000.000 |
| | Íalt | 7.000.000 |

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

- Nú kom Hildur Eyðunsdóttir

- Nú fór Jan Christiansen

**218/08** **<u>2008-4390</u>**

**<u>Áheitan frá Advokatfelagnum vegna Sp/f Maskingrevstur at broyta leigusáttmálin á matr. nr. 34c, Nólsoy.</u>**

Sp/f Maskingrevstur hevur frá P/F Eik Banka yvirtikið virkisbygningin á leigaða økinum matr. nr. 34c, Nólsoy, hvørs eigari er Tórshavnar kommuna.

Eik Banki leigar økið, ið bygningurin stendur á, men sambært § 9 í leigusáttmálanum hevur leigari rætt til at framleiga ella avhenda einstaklingi ella felag alt tað leigaða til sama endamál móti, at ein slíkur leigari tekur við somu rættindum og skyldum sum leigarin, ið verið hevur higartil, og at leigusáttmálin fær neyðuga áskrift um hetta.

Í sambandi við, at Sp/f Maskingrevstur hevur keypt bygningin frá Eik Banka hevur Advokatfelagið í skrivi frá 4. november 2008 (**j.nr. 2008-4390/3**) heitt á Tórshavnar kommunu um at broyta leigusáttmálan á matr. nr. 34c, Nólsoy, so grein 3 í sáttmálanum kemur at samsvara við ásetingina í byggisamtyktini fyri økið.

Bygningurin liggur í C-økið, sum sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy, er lagt av til havnarøki. Ásetingin fyri C-økið er soljóðandi í § 20 í byggisamtyktini fyri Nólsoy:

*"Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu, samferðslu, fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t."*

Advokatfelagið vil hava kommununa at broyta § 3 í leigusáttmálanum, so hon verður soljóðandi:

*Økið verður leigað sum grundøki fyri húsum, ið skulu verða nýtt til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu, samferðslu, fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.*

Eisini biður Advokatfelagið um, at leigusáttmálin verður galdandi í 25 ár frá tí at nýggj átekning er gjørd á leigusáttmálan, ið ásetur, at Sp/f Maskingrevstur tekur við tí leigaða økinum.

Í verðandi leigusáttmála verður grundøkið leiga út fyri 8,- kr./$m^2$/árið.
Í øllum teimum verðandi leigusáttmálunum á havnaøkjunum í Tórshavnar kommunu, verður grundøkið undir vinnubygningum leiga út fyri 20,- kr/$m^2$/árið.
Vanliga orðingin fyri áseting av leigugjaldinum er:
*Leigan verður samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri øki í Tórshavnar kommunu,- í løtuni kr. 20,00 pr. $m^2$ árliga. Leigan verður goldin á havnarskrivstovuni frammanundan hvønn 1. januar og 1. juli fyri ½ ár í senn.*
Upprunaligi leigusáttmálin er frá 1977, og eru tað tí komin nógv ískoytir og rættinar. Hetta ger at leigusáttmálin kann blíva eitt sindur ógreiður, og at hann víkjir nakað frá teimum nýggju leigusáttmálunum á havnaøkjunum í kommununi. Rættast er tí at gera nýggjan leigusáttmála.

Havnarnevndin skal taka støðu til, um hon góðtekur:
at § 3 í leigusáttmálanum verður broytt samsvarandi áheitanini frá Advokatfelagnum
at leigusáttmálin fær neyðuga átekning um, at Sp/f Maskingrevstur tekur við leigumálinum á matr. nr. 34c, Nólsoy
at leigusáttmálin verður galdandi í 25 ár frá tí at nýggj átekning er gjørd at nýggj grein um at leigugjald verður ásett, har leigugjaldið verður kr. 20,00 pr. $m^2$ árliga.
at orðingin verður tann sama sum í øðrum nýggjum leigusáttmálum á havnaøkjum í Tórsh. kommunu.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til:

- at samtykkja at § 3 í leigusáttmálanum verður broytt samsvarandi uppskotinum omanfyri
- at góðkenna, at Sp/f Maskingrevstur tekur við leigumálinum á matr. nr. 34c, Nólsoy,
- at leigusáttmálin verður galdandi í 25 ár frá tí at nýggj átekning er gjørd.
- at nýggja ásetingin um leigugjøld verður soljóðandi : *Leigan verður samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri øki í Tórshavnar kommunu,- í løtuni kr. 20,00 pr. $m^2$ árliga. Leigan verður goldin á havnarskrivstovuni frammanundan hvønn 1. januar og 1. juli fyri ½ ár í senn.*
- at orðingin verður tann sama sum í øðrum nýggjum leigusáttmálum á havnaøkjum í Tórsh. kommunu.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtykt at beina málið í nólsoyarnevndina til ummælis.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við havnameistaranum, og at leggja málið fyri nólsoyarnevndina.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

- Nú kom Jan Christiansen

**219/08** **<u>2006-2315 (HH)</u>**

**<u>Viðvíkjandi leigusáttmála av fríøki matr. nr. 1do, Hoyvík.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Eigarin av matr. nr. 1mn Hoyvík, Petur Holm søkir um at leiga ein part av fríøki Millum Gilja, matr. 1do, Hoyvík, ella at halda fram sum leigari av sama øki sum Súni Abrahamsen hevur leigað og nýtt sum part av grundstykki sínum áðrenn hann seldi húsini víðari til Petur Holm.

Sáttmálin millum Súna Abrahamsen og Leilu Egholm og Tórshavnar kommunu er ikki í gildi longur, við teirri grundgeving at SA og LE hava selt matr.nr. 1mn, Hoyvík, og hava ikki goldið fyri leigu ígjøgnum longri tíð – hetta er brot á sáttmálan sambært grein 5 og 9.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at Petur Holm heldur fram sum brúkari av sama øki sum Súni Abrahamsen hevur leigað og við somu treytum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Nevndin mælir til at beina

málið í teknisku nevnd til ummælis.

**Tilmæli:**
Vísandi til at útlit ikki eru fyri at ferðslutrýstið á økinum fer at vaksa, er sannlýkt at kommununi ikki fer at tørva størri øki til veg á vegamótinum við Flatarvegin. Tó mæla býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin frá at selja ella geva brúksrætt til nevnda øki, vísandi til at privata virksemið á kommunala lendinum kann føra við sær, at útsýnismøguleikarnir verða skerdir, tá akfør skulu koyra út á Flatarvegin.

**Tekniska nevnd 30. november 2006**: Ein meirluti: Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Sjúrður Olsen samtykti at senda málið til eigarfelagið millum Gilja til ummælis. Ein minniluti: Høgni Mikkelsen mælir til at taka undir við umsóknini, so leingi sum kommunan ikki hevur brúk fyri økinum.

- Svar er komið frá eigarafelagnum.

**Tekniska nevnd 29. november 2007**: Nevndin samtykti at mæla til at Petur Holm heldur fram sum leigari av sama øki sum Súni Abrahamsen hevur leigað og við somu treytum sum undanfarni leigarin og við treytum sum eigarafelagið sambært j. nr. 2006 -2315/6 mælir til og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka við teknisku nevnd, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og leigan verður kr. 100,00 um árið.

**Býráðið 31. januar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna og fyrrverandi eigarin av matr. nr. 1mn gjørdu í 1989 leigusáttmála um ein geira av matr nr. 1do (nú 140a), ið var til víddar uml. 5x25 m framvið matr. nr. 1mn.

Í gamla málinum 39/1 1983 sæst, at byggi- og býarskipanarnevndin tann 19. apríl 1991 og fíggjarnevndin tann 1. mai 1991 samtyktu at víðka leigusáttmálan til at fevna um økið millum ogn hansara matr nr. 1mn og vegin Millum Gilja. Einki kortskjal fyriliggur hesum viðvíkjandi.

Í 1998 fær eigarin av matr nr. 1mn loyvi til at gera girðing um part av matr nr. 1do (nú 140a) eftir nærri ásettum treytum.

Við støði í upplýsingunum í málinum hevur umsitingin gjørt uppskot til leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Peter Holm viðvíkjandi parti av matr. nr. 140a, til víddar uml. 588 m². Víst verður til kortskjal, ið liggur í málinum, dagfest 13-02-2008, ið vísir økið, ið ætlanin er at leiga Peter Holm.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini til at góðkenna ella – í øðrum lagi – at beina málið til ummælis í viðkomandi faknevnd/um.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at beina málið til ummælis í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til at ferðslutekniskt er einki til hindurs fyri at viðmæla uppskotinum til leigusáttmála. Víst verður í hesum sambandi til § 5 í uppskotinum til leigusáttmála.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

**220/08** **2008-4256**

**Útbúnaðurin á bátaøkinum við Skálatrøð og Kongabrúnna.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Sum heild er útbúnaðurin, so sum teymar og grundketur o.a. í góðum standi, allar ketur og teymar verða kannaðar av kavara hvørt heyst, soleiðis at alt neyðugt viðlíkahaldsarbeiði er gjørt, áðrenn veturin kemur, eisini verður alt skrásett, soleiðis at vit kunnu vita, nær neyðugt at skifta ketur og teymar út.

Men í Tórshavn við Skálatrøð og Kongabrúnna eru bátabummarnir til flótibrúgvarnar og el-skipanin í sera ringum standi.

Viðvíkjandi bátabummunum hava vit í dag tann trupulleika, at teir eru blivnir 26 ára gamlir, og eru sostatt farnir 1 ár útyvir ta livitíð, sum framleiðarin hevur sett á. Seinastu árini eru fleiri og fleiri bummar brotnir hvønn vetur, og seinasta vetur (2007) brotnaðu bummar nærum hvørja ferð illveður var. Brotnu bummarnir gera onkuntíð skaða uppá bátarnar sum liggja har. Hetta er ein óheppin støða, sum neyðgut er at gera nakað við. Tilsamans kosta nýggir bummar um 4 mió.

El-skipanin er 10 ára gomul og í ringum standi, nógvur peningur verður hvørt ár nýttur til at umvæla og skifta káplar, men hetta er alt bert lappaloysnir. Tilsamans

kosta nýggj el-skipan um 2 milliónir krónur.

Sostatt standa útreiðslur uppá umleið 6 mió. fyri framman, sum ikki kunnu fíggjast um vanliga raksturin.

Um bátagjaldið verður hækkað fyri at fáa samlaða raksturin at javnviga, so kann peningur savnast til at fíggja hesar stóru høvuðsumvælingar frameftir, men størsti parturin av peninginum til nýggjar bummar og el-skipan má útvegast beinanvegin.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og havnameistarin mæla til, at býráðið játtar 4 mió. til hesar høvuðsumvælingar, sum verða gjørdar yvir eitt 3 ára skeið.

Arbeitt verður við ætlan um loysn av restfíggingini.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og havnameistaranum av konto 90.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 6 atkvøðum fyri og 0 ímóti at taka undir við uppskotinum frá Elin Lindenskov um at beina málið í havnarnevndina.

Fyri atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtyktu at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini 8. oktober 2008.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

- Nú fór Hildur Eyðunsdóttir

**221/08** **<u>2008-3994</u>**

**<u>Høvuðsumvæling og víðkan av havnarskrivstovuni</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Flutt bleiv inn í verðandi havnarskrivstovu í 1987. Havnarskrivstovan, sum er ovasta hædd omana á bygninginum hjá Faroe Ship, er 152 $m^2$ til víddar.

Síðani innflytingina eru at kalla ongar ábøtur gjørdar, og eru hølir og innbúgv nú merkt av sliti, umframt at umstøðurnar hjá starvsfólkunum, trongja til bata.

Ovasta hæddin á bygninginum er tilsamans 241 $m^2$, harav verðandi havnarskrivstova er 152 $m^2$ , meðan Faroe Ship eigur restina 90 $m^2$.
Faroe Ship eru sinnaðir at leiga 45 $m^2$ til Tórshavnar havn frá 1/1-2009 at rokna, og aðrar 45 $m^2$ frá 1/1-2010 at rokna.

Faroe Ship langtíðar leigar grundøkið undir bygninginum frá Tórshavnar havn.

Í uppskotinum til leigusáttmálan við Faroe Ship, j. nr.2008-3994, um at leiga teirra part av ovastu hæddini, er leigumálið galdandi til 2018, ella so leingi sum leigan um grundøkið er galdandi.

Umframt at vaksa um havnarskrivstovuna, er ætlanin at gera umfatandi broytingar av havnarskrivstovu og innbúgvi, sum er mett at kosta 1,5 mió.

Í byggitíðini verður helst neyðugt at flyta í onnur hølir.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála j.nr. 2008-3994

Eisini verður mælt til at bjóða út arbeiðið at høvuðsumvæla havnarskrivstovuna.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

- Nú fór Jógvan Arge.

**222/08** **2008-4554**

**Endurskoðan av reglugerð fyri bátaplássini á landi.**

Verðandi reglugerð fyri bátar, sum eru tiknir upp og standa á landi, kom í gildi 15. juli 2001.

Í verðandi reglugerð kunnu bátar standa ókeypis á bátaøkinum í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 30. apríl.
Hendan reglan bleiv gjørd, fyri at tað skuldi verða pláss hjá øllum at koma upp á tað avmarkaða bátaøkið á Argjum og í Álakeri.

Tað er nú neyðugt at stytta um tíðarskeiðið, har bátar kunnu standa ókeypis á økinum, tí við verðandi skipan, eru bátaøkini full líka frá 1. oktober til 30. apríl, soleiðis at ongin bátur hevur møguleika at koma upp til umvælingar í hesum tíðarskeiðinum.
Í nýggja uppskotinum er ókeypis tíðarskeiðið frá 1. desember til 28. februar.

Onnur broytingin er, at alt sum stendur á økinum má vera merkt, og at bátastólar og- vognar, máa beinast burtur av økinum, tá báturin er á sjónum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við endurskoðaðu reglugerðini.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

- Nú kom Jógvan Arge.

- Nú kom Hildur Eyðunsdóttir

**223/08** **2008-4607**

**Klaga frá Jákup Mørkøre í sambandi við valið til staðbundnu nevndina á Hvítanesi. Kommunuvali 2008**

Jákup Mørkøre hevur tann 11. november 2008 kært um valið til staðbundnu nevndina á Hvítanesi.

Hann vísir á: Tá eg kom á val kl. 18 í kvøld, fekk eg ongan atkvøðuseðil til Hvítanesnevndina! Fólk stóðu sum kánus og vistu ikki beinanvegin, hvussu mannagongdin var!Eg fekk varhugan av, at hetta hevði verið galdandi fyri allan dagin! Okkurt má vera galið! Er samsvar millum fólk av Hvítanesi, sum hava atkvøtt til býráðsvalið í dag og tey, sum hava greitt atkvøðu til Hvítanesnevndina?

Sambært løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni um val til allar føroyskar kommunur, skal býráðið viðgera kærur um valið. Áðrenn bygda(r)ráðið/býráðið tekur avgerð sína, verður ummæli valnevndarinnar um málið at fáa.

Valnevndin fekk skrivið og heitti á valstýrið um at lýsa mannagongdina fyri val til hvítanesnevnina.

Sí skriv frá valstýrinum, dagfest 20.11.2008.

”*Víst verður til brævfrá valnevndini 13.11.2008 um klagu í sambandi við valið til staðbundnu nevndina á Hvítanesi, har valnevndin biður valstýrið lýsa mannagongdina fyri val til Hvítanesnevndina.*

*Valið til staðbundnu nevndina á Hvítanesi varð skipað í somu høll sum valið til Tórshavnar Býráð.*

*Høllin varð skipað soleiðis, at listar við upplýsingum um uppstillað og stillarar hingu í gongini og við hvørt valborð – hetta bæði v.v. valinum til Tórshavnar Býráð og staðbundnu nevndina á Hvítanesi.*

*Listin og atkvøðuseðlar til staðbundnu nevndina á Hvítanesi lógu á borði 1. Um fólk komu til hini borðini varð farið eftir listanum og atkvøðuseðli. Onkur einstøk misskiljing kom í við eitt borð, tá fólk, ið ynsktu at velja til Hvítanesnevndina vórðu biðin um sjálvi at fara til borð 1 eftir valkorti.*

*Valstýrið metir tað ikki sum sína uppgávu at eggja fólki til at greiða atkvøðu við ávíst val, eitt nú til Hvítanesnevndina. Spurningurin um , hvørt ein veljari ynskir at greiða atkvøðu ella ikki, er ein privat søk. Tí valdu vit at lýsa væl við*

*møguleikanum – bæði í gongini og við hvørt valborð – heldur enn at spyrja fólk í almenningi, hvat val tey ynsktu at greiða atkvøðu til*".

Valnevndin hevur á fundi 26. november 2008 viðgjørt skrivið frá valstýrinum og nevndin tekur undir við niðurstøðuni hjá valstýrinum.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen.

**224/08** **2008-3700**

**Nevndarviðgerð: Rundkoyring Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur – Útbjóðing Arbeiðstøka**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 2002-2014 og mál nr. 2008-1244.

Umsitingin hevur latið gjørt útbjóðingartilfar og tíðarætlan saman við ráðgevanum HMP- Consult Sp/f. Víst verður til TK j. nr. 2007-2151, 2007-2152, 2007-2153 og 2007-2155.

**"Trafiksikkerhedsrevision":**
Umsitingin hevur havt verkætlanina "Rundkoyring Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur" til "Trafiksikkerhedsrevision" hjá fyritøkuni Viatrafik í DK..

**Endalig góðkenning av verkætlanini hjá friðingarmyndugleikum:**
Umsitingin hevur eina latið umsókn inn til Náttúrufriðingarnevndina fyri Streymoyar Sýslu um góðkenning av verkætlanini Dispositiónsuppskot "Rundkoyring Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur" D= 30 m, sum yvirfriðingarnevndin hevur góðkent.. Høvuðsprojektið við nýggjum diametri á 37 m má góðkennast av nýggjum hjá friðingarmyndugleikunum

**Plantuvøkstur fram við ognini hjá Sverra Joensen:**
Trø eru plantað fram við núverandi Hvítanesvegi og nakað fram við Eystara Ringvegi fram við ognini hjá Jákup Sverra Joensen. Avtala er gjød um, at hesi trø verða flutt, meðan arbeiðið fer fram fyri síðani at verða plantaði aftur í ein

ljóðvollan. Eisini er ætlanin at planta trø og vøkstur í vegaskráarnar ímóti ognini hjá Landsverk og inni á ognini hjá Miðlon.

**Ljóðvolli**:
Sum liður í samráðingunum við Jákup Sverra Joensen, inniheldur útbjóðingartilfarið eina 0,6 m høga grótlaðing og ein ljóðvolla fram við ognini hjá Sverra Joensen, matr. nr. 1337, Tórshavn.

**Fyribilsvegur, meðan arbeðið verður gjørt:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til fyribilsveg rundan um arbeiðsøkið, meðan arbeiðið fer fram. Víst verður til tekning, sí TK j. nr. 2008-1243/1. Fyribilsvegurin er við í útbjóðingartilfarinum.

**Tíðarætlan:**
Byggitíðin er sett til níggju mánaðir.

**Útvegan av lendi:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við eigaran av matr. nr. 1337, Tórshavn, Jákup Sverra Joensen. Ein busslummi verður gjørdur inni á ognini hjá Jákup Sverra Joensen á Eystara Ringvegi í niðara borði. Neyðugt er tí at kommunan ognar sær umleið 1500 m² frá Jákup Sverra Joensen.

Hvítanesvegurin verður rættaður upp í mun til verandi veg, og harvið verður nakað lendi at liggja millum matr. nr. 1337 og komandi Hvítanesveg. Hetta lendið er umleið 1500 m² til stødar og svarar tískil til støddina á busslummanum. Umsigintin hevur gjørt avtalu við eigaran av matr. nr. 1337 um at gera eitt makaskifti lendinum viðvíkjandi.

Nú diameturin á rundkoyringini er broyttur frá 30 m til 37 m, er neyðugt, at kommunan ognar sær umleið 1107 m² til sjálva rundkoyringina. Afturat verður neyðugt at útvega umleið 1500 m² til ein busslumma í ovara borði á Eystara Ringvegi av ognini hjá Miðlon, matr. nr. 1333a, Tórshavn. Umsitingin hevur verið í samráðingum við Mads Winther vegna Miðlon. Samráðingarnar eru ikki lidnar og halda fram.

**Lisitatión:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgevanum HMP- Consult, fyrireikað eina innbodna útbjóðing, sí TK j. nr. 2008-3276, 2008-3278, 2008-3278 og 2008-3697. Í sambandi við innkomin tilboð verður víst til tey bjóðandi, TK j. nr. 2008-3698/1-4, lisitatiónsprotokoll, skjal nr. 5 og tilmæli frá ráðgeva, skjal nr. 6.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ráðgevin hevur gjørt eina kostnaðarmeting av verkætlanini, TK j. nr. 2008-3699/1. Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað óvæntaðar útreiðslur, ráðgeving, umsiting hjá Tórshavnar kommunu og 6,25% mvg, sí TK j. nr. 2008-3699/2. Kunnað verður á fundinum um hesa samlaðu upphædd.

Umsitingin kemur at greiða frá innkomnu tilboðunum frá lisitatiónini. Á íløguætlanini fyri 2008 eru markaðar kr. 4,3 mió. til verkætlanina.

**Ískoyti:**
Arbeiði varð boðið út til 6 arbeiðstakarar, og inn komu 3 tilboð. Lægsta tilboði var uppá kr. 14.011.393,00. Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað óvæntaðar útreiðslur, ráðgeving, umsiting hjá Tórshavnar kommunu og 6,25% mvg, sí TK j. nr. 2008-3699/2, og verður samlaði kostaðurin mettur til kr. 18.902.191,-.

Eftir lisitatiónina hevur umsitingin, biði ráðgeva gera plantekning (j. nr. 2008-3783/1 og 2) og eina meting av kostnaðinum við ljósregulering av ferðsluni á vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur. (j. nr. 2008-3797/3). Kostnaðurin verður mettur til kr. 5.183.000,-, íroknað prosjektering, óvæntaðar útreiðslur og 6,25% mvg. Í hesi upphædd er eisini írokna breiðkan av Hvítanesvegnum og Eystara Ringvegi fyri bíðirøðum. Busslummar eru ikki íroknaðir hesa meting.

Býráðið hevur í 2006 játtað kr. 540.000 til rundkoyring á Hvítanesvegnum. Av hesum eru kr. 374.000 tøkar. Býráðið hevur harumframt markað kr. 4.300.000 til rundkoyring á Hvítanesvegnum á íløguætlanini fyri 2008. Við støði í kostnaðarmetingini fyri eina loysn við ljósregulering, kann henda gerast við eini meirjáttan á kr. 509.000 afturat tøka peninginum frá 2006 og markaðu upphæddini fyri 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at lisitatiónin í sambandi við rundkoyringina verður ógildað, og at gjørt verður nýtt útbjóðingartilfar av loysnini við ljósregulering, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión til somu tilboðsgevarar, ið góvu boð uppá rundkoyringina. Somuleiðis verður mælt til, at peningurin sum higartil er játtaður og markaður til loysnina við *rundkoyring*, verður fluttur til loysnina við *ljósregulering*.

**Tekniska nevnd 21. august 2008:** Vísandi til óvæntaða høga kostnaðin av rundkoyringini samtykti ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Halla Samuelsen, at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, halda fast um, at rundkoyring skal verða á vegamótinum og mæla til at nýtt og bíligari prosjekt verður gjørt, við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka upp samráðingar við lægstbjóðandi um kostna fyri gerð av rundkoyring við einum diametri uppá 30 m, at leggja fyri teknisku- og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur biður um hetta málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti.**
Umsitingin hevur sambært áheitan frá borgarstjóranum havt samráðingar við lægstbjóðandi um eina rundkoyring D= 30m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin hevur fingið tilboð frá Andrias Berg Sp/f. áljóðandi kr. 10.128.046,54. Víst verður til TK. j. nr. 2008-3698/7.

Umsitingin hevur eisini gjørt eina samlaða kostnaðarmeting av tilboðnum íroknað óvæntaðar útreiðslur, ráðgeving, umsiting hjá Tórshavnar kommunu og 6,25% mvg, sí TK j. nr. 2008-3699/4. Harumframt er gjørt notat í sambandi við møguligar loysnir við shuntum saman við fyriliggjandi uppskoti um rundkoyring á D=30m. Víst verður til TK. j. nr. 2008-4391/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til tilmælið til nevndarfundin 21. august 2008.

**Tekniska nevnd 30. oktober 2008:** Ein meiriluti, Halla Samuelsen, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at gera sáttmála við Sp/f Andreas Berg og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at tikið verður av tilboðnum frá Sp/f Andreas Berg uppá gerð av eini rundkoyring, ið er 37 m í diametur sambært skjali nr. 2008-3699/2, vísandi til at øll tann tunga ferðslan av kajøkinum skal koyra um hesa rundkoyring.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til sína støðu í samtyktini hjá meirilutanum í teknisku nevnd 21. august 2008 og til sína støðu í samtyktini hjá meirilutanum í teknisku nevnd tann 29. november 2007 í máli nr. 2002-2014.

**Ískoyti:**
Jan Christiansen hevur biðið um hetta mál á skrá.

**Býráðið 27. november 2008:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Kathrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Halla Samuelsen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at beina málið í fíggjarnevndina, vísandi kommunustýrisskipanina §6 stk. 2, tí einki tilmæli er til málið í dag og §14 stk. 4 tí fíggjarnevndin ikki hevur haft málið til ummælis, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hanen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen um at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd 30. oktober 2008, um at gera sáttmála við Sp/f Andreas Berg, um ger av rundkoyring D=30, og at játta kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4 av konto 90 , ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Leivur Hansen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Kathrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Halla Samuelsen og Elin Lindenskov .

Leivur Hansen gjørdi vart við, at hann hevði biðið borgarstjóran og kommunustjóran um at fáa málið á fíggjarnevndarskránna 25. november 2009, men at hetta ikki varð gingið á møti.

**225/08** **<u>2008-3983</u>**

**<u>Uppskot til ársfíggjarætlan 2009 hjá Tórshavnar kommunu</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býráðið hevur 11. september 2008, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2009, ið javnvigar við tkr. 617.692.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2009, við støði í samtyktunum hjá faknevndunum, og javnvigar uppskotið nú við 1. viðgerð við tkr. 656.892. Munurin tkr. 39.200 kemst av framfluttum íløgum.

**1. viðgerð:**

**Útreiðslur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 24.226 |
| - | 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 9.172 |
| - | 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 19.648 |
| - | 04 | Kt-deildin | - | 6.077 |
| | | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **59.123** |
| | | | | |
| Konto | 11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 18.273 |
| - | 12 | Umhvørvismál | - | 1.600 |
| - | 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13547 |
| - | 15 | Renovatión | - | 19.238 |
| - | 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 19.300 |
| - | 18 | Bussleiðin | - | 19.341 |
| - | 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 10.152 |
| - | 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 12.199 |
| | | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **113.650** |
| | | | | |
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 50 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 560 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 844 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 416 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 2.678 |
| - | 241 | Ítróttarhøllin í Kollafirði | - | 500 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.527 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 4.085 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.396 |
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 3.316 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.463 |
| - | 291 | Hoyvíkshøllin | - | 475 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.612 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.128 |
| | 310 | Skúlin við Løgmannabreyt | - | 2.682 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.825 |
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 4.457 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **47.014** |
| | | | | |
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 601 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.839 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.743 |
| - | 37 | Stadion | - | 4.051 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 11.860 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.022 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **32.116** |
| | | | | |
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 19.457 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.510 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 395 |
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 10.300 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 670 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 590 |
| - | 435 | Sambýlið í Mattalág | - | 670 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 |
| - | 441 | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **36.592** |
| | | | | |
| konto | 45 | Kommunala dagrøktin | kr. | 6.310 |
| - | 46 | Miðstovnurin í Gundadali | - | 1.760 |
| - | 47 | Dagstovnurin Lítliskógur | - | 5.062 |
| - | 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | - | 2.531 |
| - | 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | - | 2.578 |
| - | 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | - | 2.721 |
| - | 51 | Býlingshúsið millum Gilja | - | 2.702 |
| - | 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | - | 2.626 |
| - | 53 | Býlingshúsið Vesturi á Flat | - | 2.816 |
| - | 54 | Býlingshúsið Inni á Gøtu | - | 2.911 |
| - | 560 | Dagstovnurin í Hoyvík | - | 4.757 |
| - | 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | - | 3.539 |
| - | 562 | Dagstovnurin Millum Bóla | - | 1.808 |
| - | 563 | Dagstovnurin við Landavegin | - | 3.977 |
| - | 564 | Stella Maris vøggustova | - | 3.197 |
| - | 565 | Dagstovnurin Sólareygað | - | 4.243 |
| - | 566 | Dagstovnurin í Løkjutúni | - | 3.826 |
| - | 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | - | 6.546 |
| - | 568 | Barnagarðurin á Velbastað | - | 3.289 |
| - | 569 | Dagstovnurin Látrið | - | 1.231 |
| - | 572 | FTS í Hornabø | - | 1.653 |
| - | 573 | FTS Smílibýlið | - | 1.378 |
| - | 574 | FTS Blóma | - | 2.287 |
| - | 575 | FTS í Badmintonhøllini | - | 1.763 |
| - | 579 | FTS í Hoyvík | - | 1.984 |
| - | 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | - | 3.292 |
| - | 582 | Dagstovnurin Birkilund | - | 6.137 |
| - | 583 | Dagstovnurin Flatnagarður | - | 1.214 |
| - | 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | - | 2.578 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 585 | Dagstovnurin Kurl@ | - | 1.931 |
| - | 587 | Dagstovnurin við Botnánna | - | 1.490 |
| - | 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | - | 3.730 |
| - | 588 | Margarinfabrikkin | - | 2.581 |
| - | 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | - | 14.348 |
| | 599 | Barna- og ungdómsdeildin | - | 24.170 |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **138.966** |
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 11.210 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 42.335 |
| | 63 | Útveganir | - | 5.000 |
| | 68 | Útskiftan av amboðum | - | 7.000 |
| | 69 | Nýútvegan av amboðum | - | 3.000 |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **68.545** |
| **Konto** | **66** | **Reguleringskonto** | **kr.** | **2.500** |
| | | **Rakstararútreiðslur íalt** | **kr.** | **498.506** |
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 145.200 |
| | Smábátahavn | | - | 4.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **647.706** |
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 7.236 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 1.950 |
| | **Lánsgjøld** | | **kr.** | **9.186** |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **656.892** |

**Inntøkur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 3.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000 |
| - | 85 | Aðrar inntøkur og útreiðslur | - | 0 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 598.796 |
| | At fíggja v. tøkum/framfluttur peningi | | - | 52.096 |
| | **Inntøkur íalt** | | **kr.** | **656.892** |

**Íløgur:**

| | | |
|---|---|---|
| Glyvursvegur 1-4. stig | kr. | 5.000 |
| Kloakkir | - | 10.000 |
| Renovatión | - | 2.200 |

| | | |
|---|---|---|
| Kirkjugarðar | - | 2.000 |
| Fríðkan av býnum | - | 2.500 |
| Ítróttur og frítíðarvirksemi | - | 29.500 |
| Barnaansing | - | 2.000 |
| Skúlar og mentan | - | 87.000 |
| Eldraøkið | - | 5.000 |
| Smábátahavnir | - | 4.000 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **149.200** |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. oktober 2008:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Leivur Hansen samtyktu at taka undir við uppskotinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Sjúrður Olsen taka støðu seinni.

Byggi- og býarskipanarnevndin umsitur konto 38 og 82.

**Sosiala nevnd 2. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Sosiala nevnd umsitur konto 40, 41, 411, 42, 43, 431, 432, 433, 434, 435, 44 og 441.

**Brunanevndin 2. oktober 2008:** Samtykt at fíggjarætlanin verður kr. 10.152 mió.

Málið fer í fíggjarnevndina.

Konto 68 Útskiftan av amboðum – vísir nevndin á, at kommunan eigur amboð o.a. fyri kr. 100 mió. og tí verður mælt til at seta meira enn 6 mió. av í 2009.

Brunanevndin umsitur konto 19 og viðmælur konto 68, sum fíggjarnevndin umsitur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. oktober 2008:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal, samtykti at beina málið í fíggjarnevndina við eini samlaðari upphædd til veitingar innan umhvørvi áljóðandi tkr. 20.838. Ein annar minniluti, Jan Christiansen og Beate L. Samuelsen tekur støðu á einum seinni fundi.

Heilsu- og umhvørvisnevndin umsitur konto 12 og 15.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Inga Dahl, taka støðu á býráðsfundi.

Mentamálanevndin umsitur konto 20, 21, 22, 23, 24, 241, 25, 26, 27, 28, 29, 291, 30, 31, 310, 32, 33, 34, 35, 36, 37, 39 og 64.

Eisini umsitur mentamálanevndin hesar kontoir 45, 46, 47, 48, 49, 50, 51, 52, 53, 54, 560, 561, 562, 563, 564, 565, 566, 567, 568, 569, 572, 573, 574, 575, 579, 58, 582, 583, 584, 585, 587, 589, 588, 59 og 599.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við ársfíggjarætlanini álj. tkr. 70.401 og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

Tekniska nevndin mælir harumframt til at avsettar verða á konto 60-3500 hátíðarhald, flagging o.a. tkr. 940, 60-7170 inntøkur av parkeringsskipanini tkr. 2.500 og 60-6171 útreiðslur av parkeringsskipanini tkr. 1.500.

Tekniska nevndin umsitur konto 11, 14, 16 og 18.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 0 ímóti at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, , Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.
Greiddu ikki atkvøðu Jan Christiansen , Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Vagnur Johannesen og Inga Dahl.

Jan Christiansen boðaði frá, at minnilutin kemur við broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**2. viðgerð**

**Fíggjarnevndin 25. november 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir við 2. viðgerð býráðnum til at góðkenna uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009.

Tó hevur Leivur Hansen viðmerking um, at hann ikki tekur fult undir við sundurliðingini av íløgunum.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen samtykti eisini at mæla býráðnum til, at áseta skattaprosentið til 19,75 og barnafrádráttin til kr. 5.500.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 27. november 2008:** Áðrenn atkvøðugreiðsluna gjørdi Jan Christiansen vart við, at minnilutin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan og tekur undir við viðmerkingunum hjá Leivur Hansen.

Einmælt samtykt.

**226/08** **2008-3913**

**Fíggjarætlanin 2009 hjá Tórshavnar Havn**

Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Áðrenn fíggjarnevndin framleggur uppskot til fíggjarætlan, leggur fíggjarnevndin uppskot til fíggjarkarmar fyri býráðið til nevndirnar at leggja fíggjarætlan eftir.

**Havnarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at leggja karmarnar uppá tkr. 50.500 fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at taka undir við havnarnevdnini.

**Býráðið 11. september 2008:** Framlagt.

**Havnarnevndin 29. september 2008:** Samtyktu fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við tkr. 50.500 og at senda hana til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til ársfíggjarætlan 2009 við 1. viðgerð.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til ársfíggjarætlan 2009 við 1. viðgerð.

**2. Viðgerð:**

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtyktu fíggjarætlanina við 2. viðgerð, sum javnvigar við tkr. 50.500 og at senda hana til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið við 2. viðgerð.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

- Nú fór Høgni Mikkelsen

**227/08** **2007-2955**

**Fíggjarætlan 2008- eykajáttanir.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

**a.** Við árslok 2007 vóru tilsamans 96.693 tkr. fluttar fram sum ikki brúkt játtan. Broytingin er rakstrarførd undir serligum upphæddum í roknskapinum 2007 og sett upp undir eginognini. Upphæddin kann sundurgreinast soleiðis:

Deildir undir blokkskipanini – sí granskoðaraprotokoll síða 227, pkt. 5.2

| Endamál | Hækking á konto | | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Vegir og gøtur | 11 | tkr. | 3.049 |
| Umhvørvismál | 12 | - | 575 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | 848 |
| Brennistøðin | 15 | - | 2.482 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | 266 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 1.641 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hests skúli | 20 | - | 62 |
| Nólsoyar skúli | 21 | - | -58 |
| Velbastaðar skúli | 22 | - | -61 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 121 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | -1.067 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 578 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | -513 |
| Eysturskúlin | 27 | - | -78 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | -30 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | -196 |
| Argja skúli | 30 | - | 280 |
| Kvøldskúlin | 31 | - | 559 |
| Musikkskúlin | 32 | - | 252 |
| Býarsavnið | 34 | - | 610 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 1.247 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -459 |
| Stadionøkið | 37 | - | -443 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | 1.367 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | -82 |
| Dagtilhald í Nólsoy | 44 | - | 206 |
| Nýútveganir | 63 | - | 2.409 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 6.816 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | 95 |
| Sethús | 81 | - | 2.589 |
| Onnur hús | 82 | - | 84 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 2.320 |
| Íløgur | 90 | - | 69.300 |
| Barnaansing | | - | 1.914 |
| Framfluttar játtanir íalt frá 2007 | tkr. | | 96.693 |

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

- Nú kom Høgni Mikkelsen

**b. Eykajáttanir í 2008 av reguleringskonto:**

| | | Tkr. |
|---|---|---|
| Miðfyrisitingin eyka arbeiði, 2008-193 | - | 45 |
| Westward Ho, 2007-3688 | - | 100 |
| Marknaumskipan, 2005-2756 | - | 25 |
| Flótibrúgv á Gomlurætt,2007-2935 | - | 320 |
| Jobmatch, 2008-1425 | - | 200 |
| Heildarætlan fyri ítrótt, 2008-3236 | - | 200 |
| Skrivstovuhølir, 2008-0194 | - | 200 |
| Reinsaríið, 2005-1183 | - | 150 |
| Sakarmál um endurgjald, 2007-0124 | - | 116 |
| Endurgjald fyri øki, 2000-1011 | - | 19 |
| Westward Ho, 2008-4254 | - | 100 |
| Valútreiðslur, 2008-4258 | - | 450 |
| Hoyvíkar skúli, 2008-4620 | - | 380 |
| Kollafjarðar skúli, 2008-4619 | - | 350 |
| Játtað av reguleringskonto íalt | tkr. | 2.955 |

**Býráðið 27. november 2008: Einmælt samtykt.**

**c. Flytingar millum konti:**

**2008-4443**
Bussleiðin,

| | | |
|---|---|---|
| av konto 11, Vegir, gøtir v.m. | - | 750 |
| til konto 18, Bussleiðin | - | 750 |

**2007-0065**
Hús og pláss til Lendisdeildina

| | | |
|---|---|---|
| Av konto 01, Miðfyrisitingin | - | 500 |
| Av konto 02, Trivnaðarfyrisitingin | - | 500 |
| Av konto 03, Tekniska fyrisitingin | - | 1.200 |
| Av konto 11, Vegir, gøtur v.m. | - | 2.000 |
| Av konto 14, Vatnveiting og gøtuljós | - | 300 |
| Av konto 16, Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 500 |
| Av konto 38, Fríðkan av býnum | - | 2.000 |
| Til konto 90, Íløgur | - | 7.000 |

**Býráðið 27. november 2008: Einmælt samtykt.**

# Mál uttan fyri skrá

**228/08** **2008-4744**

**Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at dagføra/broyta § 36 í kommunustýrisskipanini, tí nýggj kunngerð er komin í gildi, og við tað at Nólsoyar-, Kirkjubøar- og Hest kommunur eru komnar uppí Tórshavnar kommunu. Tá var tali á limum úr Tórshavnar kommunu 5, tveir vóru úr Nólsoyar-, Kirkjubøar- og Hest kommunum.

**Eisini mælir borgarstjórin til:**

at dagføra/broyta § 37 í kommunustýrisskipanini, tí nýggj barnaverndarlóg kom í gildi 8. mars 2005. Í lógini § 4, stk. 2, stendur, at í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir.

Talið á nevndarlimum varð avgjørt at vera 7, tá Kollafjørður kom uppí Tórshavnar kommunu. Hetta var eftir gomlu barnaverndarlógini, har limirnir høvdu ein nógv virknari leiklut í málsviðgerðini, enn teir hava í dag, og tí eisini fyri at minka um arbeiðsbyrðuna hjá einstaka nevndarliminum.

Eftir nýggju barnaverndarlógini er øll málsviðgerð hjá umsitingini, nevndin tekur avgerðir við grundarlagi í væl fyrireika mál. Arbeiðsbyrðan er tí ikki eins stór, ein nevnd við 5 limum hevði tí verið meira hóskandi í dag.

Vísandi til omanfyristandandi mælir borgarstjórin eisini til at broyta talið á barnaverndarlimum frá 7 til 5.

**Broytingin verður soljóðandi:**

## § 36
## Skattakærunevndin

**1. petti**. Skattakærunevndin hevur 7 limir og 7 tiltakslimir úr Tórshavnar kommunu, sbrt. kunngerð nr. 94 frá 21. desember 2004 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um skattakærur og fyriskipanum, eru løgd undir hana og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**§ 37**
**Barnaverndin**

**1. petti**. Barnaverndarnevndin hevur 5 limir og 5 varalimir, sbrt. løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007.

**2. petti**. Nevndin virkar við grundarlagi í barnaverndarlógini, kunngerðum, reglum og fyriskipanum um barnavernd, og tekur avgerðir eftir tilmæli frá barnaverndarumsitingini.

**Kommunustýrisskipanin kemur at síggja soleiðis út:**

# KOMMUNUSTÝRISSKIPAN

# fyri

# Tórshavnar kommunu

**Evnisyvirlit:**

1. partur Býráðið
2. - Borgarstjórin
3. - Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a.
4. - Fíggjarnevndin
5. - Føstu nevndirnar
6. - Aðrar nevndir
7. - Samsýningar o.a.
8. - Broytingar í stýrisskipanini o.a.

## 1. partur
## Býráðið

§ 1

Býráðið hevur 13 limir, ið verða valdir eftir teim til eina og hvørja tíð galdandi reglunum í kommunalu vallógini.

§ 2

**<u>1. petti</u>.** Samsvarandi reglunum í kommunustýrislógini velur býráðið við meirilutavali ein borgarstjóra fyri alt valskeið býráðsins. Borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv. Eisini velur býráðið við lutfalsvali ein 1. og ein 2. varaborgarstjóra.

**<u>2. petti</u>**. Um borgarstjórin ella varaborgarstjórin av eini ella aðrari orsøk hevur forfall, røkja 1. ella 2. varaborgarstjórin í hesi raðfylgju borgarstjórastarvið. Varir fráveran meira enn 2 mánaðir, skal býráðið velja fyribils borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað við gildi, til fráveran heldur uppat.

§ 3

Býráðið samtykkir eina fundarskipan, ið m.a. ásetur nærri reglur um fyrireiking, fundarboð,

hvussu fundir skulu haldast og málsmannagongd o.a.

§ 4

**<u>1. petti</u>.** Býráðið tekur avgerð um, nær og hvar vanligir býráðsfundir skulu vera. Við byrjanini av hvørjum álmanakkaári verður hetta kunngjørt á tann hátt, ið vanliga verður nýttur í kommununi. Býráðið hevur almennan fund vanliga eina ferð um mánaðin.

**<u>2. petti</u>.** Eykafundir verða hildnir, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av limunum krevur tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundirnir skulu vera, og um høvi er til tess, verða hesir almannakunngjørdir.

**<u>3. petti.</u>** Limur, ið hevur tørv at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til kommunustjóran.

## 2. partur

## *Borgarstjórin*

**§ 5**

**1. petti**. Nærri reglur um virksemi borgarstjórans verða ásettar í kommunustýrisskipanini, sambært § 22 í kommunustýrislógini.

**§ 6**

**1. petti.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hetta er lýst í kapittul 4 í kommunustýrislógini, og eru uppgávur hansara m.a. hesar:

- hevur dagliga leiðslu av kommunalu fyrisitingini,
- býtir málini út til tær ymisku nevndirnar,
- tekur sær av málum, sum ikki fara í nakra nevnd,
- gevur fundarboð,
- fyrireikar býráðsfundir,
- kunnar býráðslimir um, hvørji mál koma fyri á fundum,
- leggur mál og málsupplýsingar fram við einum hóskandi tíðarskeiði, so at býráðslimir kunnu gera sær sína egnu meting um málið,
- boðar frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund,
- ansar eftir, at mál, ið krevja býráðsviðgerð, fáa tilíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin,
- sær til, at málini verða avgreidd og um neyðugt gera fyriskipan um hetta,
- tekur avgerðir í málum, ið ikki tola at bíða og har eingin orsøk er til iva,
- ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum býráðsins,
- ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan og
- saman við einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess, undirskrivar skjøl, ið binda kommununa.

**2. petti**. Borgarstjórin hevur eftirlit við, at mál, ið krevur býráðsins avgerð og hoyrir undir fyrisitingarøki hjá nevnd, verður lagt fyri býráðið saman við neyðugum nevndarummæli, áðrenn býráðið tekur avgerð.

**3. petti**. Borgarstjórin hevur eyguni eftir, at einki mál liggur á láni. Nevndirnar hava skyldu til at greiða honum frá teimum málum, tær hava við at gera, og hvussu tað liggur fyri við at avgreiða tey. Um tað er neyðugt, ger hann fyriskipan fyri, hvussu málini skulu verða avgreidd.

**§ 7**

**1. petti**. Borgarstjórin ansar eftir, at hvør peningaupphædd - tað veri seg inntøka ella útreiðsla við kommunukassan - er bókað í kommunuroknskapinum, og at upphæddin hevur heimild í ársfíggjarætlanini ella eykajáttan. Er talan um eina peningaupphædd, ið heimild ikki er fyri, leggur hann málið fyri býráðið.

## 3. partur
## Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a.

### § 8

**1. petti.** Til at taka sær av teirri beinleiðis fyrisitingini av viðurskiftum kommununnar verða skipaðar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir.

**2. petti.** Býráðið velur limir í tær nevndir, stjórnir og tílíkt, har býráðið ella kommunan sambært øðrum fyriskipanum skal verða umboðað.

**3. petti.** Val av limum og tiltakslimum í fastar nevndir o.a. fer fram á fyrsta býráðsfundi og beint aftan á valið av borgarstjóra og 1. og 2. varaborgarstjóra. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sbrt. § 3. Verður avgjørt at velja av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

### § 9

**1. petti.** Býráðið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir og staðbundnar nevndir, ið skulu taka sær av ávísum málum ella gera fyrireikandi ella ráðgevandi arbeiði fyri býráðið, fíggjarnevndina ella hinar føstu nevndirnar, sí § 30, 31 og 32.

### § 10

**1. petti**. Hvør nevnd hevur sína gerðabók, har allar samtyktir nevndarinnar verða førdar. Við fundarlok verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av øllum teimum luttakandi nevndarlimunum.

**2. petti**. Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókini. Tá mál, har nevndarlimur hevur serstøðu sambært gerðabókini, verða send øðrum myndugleikum, kann nevndarlimur krevja, at myndugleikin verður kunnaður um tað, ið stendur í gerðabókini. Nevndarlimurin kann viðleggja málinum grundgeving fyri serstøðu síni.

### § 11

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**§ 12**

Nevndirnar ansa eftir, at ikki verður brúktur meira peningur enn avsettur er sambært teim einstøku upphæddunum á ársfíggjarætlanini ella er játtaður við eykajáttan. Um tað er hildið ynskjandi ella neyðugt at játta meira pening, senda nevndirnar - um fíggjarnevndina - býráðnum tilráðing hesum viðvíkjandi.

**§ 13**

Nærri reglur um nevndararbeiði kunnu verða ásettar í fundarskipan, sum býráðið góðtekur.

## 4. partur
## Fíggjarnevndin

**§ 14**

**1. petti.** Í fíggjarnevndini situr borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 4 aðrir býráðslimir.

Fíggjarnevndin fyrisitur tey málsøki, sum løgd eru til hana sambært kapittul 8 í kommunustýrislógini.

**2. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur mál viðvíkjandi kassa- og roknskaparverkinum, lønar- og starvfólkaviðurskiftum, burturleigu av ognum í minni enn fimm ár, tó ikki kommunalar íbúðir jfr. § 24, 4. petti, og allari umsiting kommununnar.

**3. petti.** Fíggjarnevndin sendir býráðnum tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum, veðseting og um burturleigu í meira enn fimm ár av ognum kommununnar.

**4. petti.** Øll mál, ið snúgva seg um fígging, skulu - áðrenn tey verða løgd fyri býráðið til samtyktar - hava verið til ummælis hjá fíggjarnevndini.

**§ 15**

**1. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununnar - íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum - verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av sær.

**2. petti.** Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í peningastovn, á postgirokonto ella settar í slík lánsbrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum.

**3. petti.** Virðisbrøv kommununnar skulu - um tey ikki verða tryggjað á annan fullgóðan hátt - fáa átekning um, at tey eru ogn kommununnar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki býráðsins. Um tað er møguligt, skal átekningin verða skrivað í bók hjá avvarðandi stovni.

**4. petti.** Somu skyldur, sum frammanfyri eru tilskilaðar, hevur fíggjarnevndin viðvíkjandi øðrum peningaognum, sum kommunan hevur um hendur.

## § 16

**1. petti.** Fyri 1. oktober sendir fíggjarnevndin býráðnum uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár.

**2. petti.** Uppskot til ársfíggjarætlan skal viðgerast tvær ferðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Ársfíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember og latin landsstýrismanninum innan 3 gerandisdagar aftaná.

**3. petti.** Við hvørjari upphædd á uppskotinum skal verða viðmerkt:

1) tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár.
2) tann upphædd, ið er avsett fyri verandi roknskaparár, og
3) tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt í undanfarna roknskaparári.

Um roknskapurin fyri undanfarna ár ikki er lagdur fram, kunnu fyribils tøl úr honum verða nýtt.

**4. petti.** Tær íleggingar- og fíggjarætlanir, ið nevndin hevur gjørt, verða lagdar fram saman við uppskotinum til ársfíggjarætlanina. Við uppskotinum skulu eisini fylgja upplýsingar um tær fíggjarligu broytingar, sum kunnu væntast í komandi roknskaparári.

## § 17

Fíggjarnevndin hevur ábyrgdina av
1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,
2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,
3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini,

4) at leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og undirskrivingar, og
5) at leggja grannskoðanarfrágreiðing fyri býráðið til viðgerðar.

**§ 18**

Fíggjarnevndin ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir ella samtyktu eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2. petti.

**§ 19**

**1. petti.** Fíggjarnevndin hevur eftirlit við fyrisitingini av peningi og bókhaldi kommununnar. Hon ansar eftir, at inntøkurnar hjá kommununi koma inn rættstundis, og at møgulig útistandandi skuld verður innkravd. Eisini ansar nevndin eftir, at eftirstøðulistar verða gjørdir og kannar hesar við hóskandi millumbili.

**2. petti.** Fíggjarnevndin ásetur tær reglur, sum kommunala umsitingin hevur at ganga eftir, tá ið tað snýr seg um at siga nevndini frá, um tað í nøkrum føri er farið - ella kann væntast at verða farið - upp um tær einstøku peningaupphæddir á ársfíggjarætlanini ella tær upphæddir, ið játtaðar eru sambært eykajáttan.

**3. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at øll onnur skjøl verða goymd á tryggan hátt.

## 5. partur
## Hinar føstu nevndirnar

**§ 20**

**1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:

1. Sosiala nevndin
2. Tekniska nevndin
3. Byggi- og býarskipanarnevndin
4. Mentamálanevndin
5. Heilsu- og umhvørvisnevndin
6. Havnanevndin

**2. petti.** Limirnir í teim í 1. petti umrøddu nevndum verða valdir millum býráðslimirnar.

**§ 21**

Eftir áheitan frá fíggjarnevndini og innan eina tíðarfreist, sum henda nevnd setur, skulu nevndirnar koma við teirra parti av uppskotinum til ársfíggjarætlanina og til gerð av íleggingar- og fíggjarætlanum.

§ 22

Hvør nevnd gevur tilmæli til býráðið í málum, innan hennara fyrisitingarøki, har tað sambært lóg áliggur býráðnum at geva tilmæli ella taka støðu.

§ 23

Hvør nevnd ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir og eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2. petti.

§ 24

## Sosiala nevndin

**1. petti.** Sosiala nevndin hevur 5 limir.

**2. petti.** Til at viðgera tey ymsu sløgini av málum kann nevndin velja eykanevndir við minst 3 limum - valdum eftir lutfalli. Formaðurin í sosialu nevndini skal helst vera formaður í ella limur av slíkum eykanevndum.

**3. petti.** Nevndin tekur avgerðir í málum, ið sambært lóggávuni hoyra undir sosialu nevndina. Í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs, hevur nevndin eisini tær heimildir, sum sambært sosialu lóggávuni eru lagdar til býráðið.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál og kommunalar íbúðir og skipar fyri útvegan av innbúgvi, amboðum og tílíkum til hesar.

**5. petti.** Nevndin fyrisitur tiltøk fyri útbúgving av ungum til arbeiðsmarknaðin.

§ 25

## Tekniska nevndin

**1. petti.** Tekniska nevndin hevur 5 limir.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur kommunalu teknisku málsøkini, sum t.d. verkstaðin, buss-leiðina, vatnverkini, vegirnar, kloakkirnar, gøtuljósini og onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

Nevndin ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri nevndu málsøki, verða fylgdar.

**3. petti**. Nevndin hevur tekniskt eftirlit við Rás Tórshavn, almennum plássum, vegum, kloakkum, reinsiverkum, almennum nátthúsum o.ø.

**4. petti**. Tá gøtu-, veg- og onnur íleggingararbeiði skulu verða sett í verk, sendir nevndin tilmæli til býráðið hesum viðvíkjandi, jfr. § 11, 2. petti, og skipar fyri, at arbeiðini verða framd samsvarandi teirri av býráðnum samtyktu arbeiðsætlan.

Nevndin fyriskipar uppsetan av navnaskeltum á gøtum, vegum, torgum, støðum o.ø. og hevur í øllum førum eftirlit við, at fyriskipanirnar í vegareglugerðini um gerð og yvirtøkur av gøtum og vegum verða hildnar.

**5. petti.** Skylda kommununnar til at reinsa gøtur, vegir og pláss (torg) er løgd til nevndina, og leiðir og útinnir hon hesi arbeiði - eisini tá talan er um kavagrevstur og at beina fyri burturkastinum frá øllum hesum arbeiðum.

**§ 26**

## Byggi- og býarskipanarnevndin

**1. petti.** Byggi- og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur øll mál, ið sambært byggilóggávu og lóg um býarskipanir og byggisamtyktir eru løgd undir býráðið.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur allar umsóknir um bygging og sundurluting og viðger hesar sambært galdandi lógum, reglugerðum og fyriskipanum og ansar eftir, at øll bygging er í samsvari við hesum.

**4. petti.** Nevndin útinnir fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur) og viðlíkahaldið av øllum bygningum, áum og veitum og jarðarognum, tað veri seg traðarognum, urtagarðs- og øðrum jarðarstykkum og trygging av virðum hjá kommununi.

**5. petti.** Nevndin sendir býráðnum um fíggjarnevndina tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum og um burturleigu í meira enn fimm ár av teimum ognum, sum nevndin útinnir viðlíkahaldi av. Eisini sendir hon eftir áheitan fíggjarnevndini tilmæli viðvíkjandi burturleigu av ognum.

**6. petti.** Nevndin hevur eftirlit við, at gingið verður eftir teimum servituttum og deklaratiónum, sum álagdar eru til frama fyri kommununa.

**§ 27**

## Mentamálanevndin

**1. petti.** Mentamálanevndin hevur 5 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur fíggjarviðurskiftini hjá kommunalum skúlum, kommunalar barnaansingarstovnar, stadion og umsitur útvegan av innbúgvi, amboðum og tílíkum til teirra. Nevndin fyrisitur, í samráð við byggi- og býarskipanarnevndina, viðlíkahaldinum av skúlabygningum, barnaansingarstovns bygningum, spæliplássum o.ø.

**3 petti.** Eisini fyrisitur nevndin Rás Tórshavn, kvikmynda- og bókasavnsviðurskifti kommununnar, søvn og onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

**4. petti.** Nevndin gevur viðmæli til býráðið í málum viðvíkjandi nøvnum á nýggjum gøtum, vegum o.ø. sambært tilmæli frá serstakari nevnd, bólki e.ø.

**5. petti.** Nevndin fyrisitur mál, ið snúgva seg um útlán og burturleigu av rúmum í kommunalum ognum til nýstlu hjá feløgum o.ø., ið ætlað eru til mentanarendamál o.a.

**6. petti.** Eftir gjøllari reglum frá býráðnum umsitur nevndin studningsjáttanir til skúlabørn og til feløg, herundir eisini fyri stovnandi tiltøkum til frama fyri slík, o.tl.

**§ 28**

## Heilsu- og umhvørvisnevndin

**1. petti.** Heilsu- og umhvørvisnevndin hevur 5 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um umhvørvisvernd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur brennistøðina, ruskinnsavnanina, jarnmóttøkuna, kemikalium, spillolju, slamsúgving, rottangatøming, tyrving o.a., og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

### § 29

## Havnanevndin

**1. petti.** Havnanevndin hevur 5 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur vinnuhavnir og smábátahavnir og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi. Sama er galdandi fyri kommunalar bygningar og annan útbúnað og ognir, ið hoyra til vinnuhavnir.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur bíðilistar til pláss í smábátahavnum og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur býráðsins vegna peningaviðurskiftum og roknskaparhaldi hjá vinnuhavnum og smábátahavnum samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi roknskaparreglum og reglum viðvíkjandi fyrisiting av havnum o.ø.
Roknskaparhaldið hjá vinnuhavnum og smábátahavnum skal haldast hvørt sær.
Loyvt er ikki at rinda møguligt hall av rakstri av smábátahavnum v.m. av inntøkum frá vinnuhavnum.

**5. petti.** Nevndin kann eisini, býráðsins vegna, fyrisita vinnuøki, ið liggja uppat havnaøki og hava tilknýti til bryggju, sama er galdandi fyri neyst og onnur høli ella økir uppat havnaøki ella fram við sjónum.

# 6. partur
# Aðrar nevndir

### § 30

## Kaldbaksnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Kaldbak verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kaldbak eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Kaldbaksnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kaldbak at gera.

§ 31

## Hvítanesnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum á Hvítanesi verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar á Hvítanesi eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Hvítanesnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar á Hvítanesi at gera.

§ 32

## Kollfjarðarnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Kollafirði verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kollafirði eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Kollfjarðarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kollafirði at gera.

§ 33

## Nólsoyarnevndin

**<u>1. petti</u>.** At taka sær av áhugamálum í Nólsoy verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Nólsoy eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**<u>2. petti</u>.** Nólsoyarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Nólsoy at gera.

### § 34

#### Kirkjubøar- Velbastaðarnevndin

**<u>1. petti</u>.** At taka sær av áhugamálum í Kirkjubø og á Velbastað verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kirkjubø og á Velbastað eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**<u>2. petti</u>.** Kirkjubøar- og Velbastaðarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kirkjubø og á Velbastað at gera.

### § 35

#### Hest- Koltursnevndin

1. petti. At taka sær av áhugamálum í Hesti og Koltri verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Hesti og Koltri eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

2. petti. Hest- Koltursnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Hesti og Koltri at gera.

**§ 36**

## Skattakærunevndin

**<u>1. petti</u>**. Skattakærunevndin hevur 7 limir og 7 tiltakslimir úr Tórshavnar kommunu, sbrt. kunngerð nr. 94 frá 21. desember 2004 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar.

**<u>2. petti</u>**. Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um skattakærur og fyriskipanum, eru løgd undir hana, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**§ 37**

## Barnaverndarnevndin

**<u>1. petti</u>.** Barnaverndarnevndin hevur 5 limir og 5 varalimir, sbrt. løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007.

**<u>2. petti</u>.** Nevndin virkar við grundarlagi í barnaverndarlógini, kunngerðum, reglum og fyriskipanum um barnavernd og tekur avgerðir eftir tilmæli frá barnaverndarumsitingini.

**§ 38**

## Brunanevndin

**<u>1. petti</u>.** Brunanevndin hevur 5 limir.

Í brunanevndini sita 3 limir, tilnevndir av býráðnum, brunaumsjónarmaðurin og ein limur, sum fútin tilnevnir.

**2. petti.** Umframt at fyrisita sløkkiliðnum í kommununi, sambært løgtingslóg um eldsbruna o.a., útinnir brunanevndin skorsteinsreinsan samsvarandi teimum reglugerðum og ársfíggjarætlanum, ið til eina og hvørja tíð eru galdandi.

## 7. partur
## Samsýningar o.a.

### § 39

**1. petti.** Borgarstjórin fær í fulltíðarstarvi sínum samsýning ájavnt við 39. flokk sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Tænastumannafelag landsins.

**2. petti.** Tá borgarstjórin fer frá, fær hann samsýning eftir somu reglum sum landsstýrismaður, sambært góðkendu skipanini viðvíkjandi eftirløn, eftirsitiløn v.m. til borgarstjóra, sum hildið verður fram við.

**3. petti.** Eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18 ár eftir borgarstjóranum í starvi fær/fáa samsýning eftir somu reglum sum eftirsitandi hjúnafelagi og børn eftir landsstýrismann, sbrt. § 12,2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

**4. petti.** Fyrrverandi borgarstjórin hevur rætt til egna eftirløn, eftir somu reglum sum fyrrverandi landsstýrismenn, sbrt. § 12, 2.1, í kunngerð um samsýning v.m sambært kommunustýrislógini.

**5. petti.** Eftirsitandi hjúnafelagi og børn eftir fyrrverandi borgarstjóra hevur, eftir somu reglum sum eftirsitandi hjúnafelagi og børn eftir landsstýrismann, rætt til part av teirri eftirløn sum borgarstjóri hevði rætt til.

**6. petti.** Eftirsitandi børn undir 18 ár hava rætt til barnaeftirløn eftir somu reglum sum eftirsitandi børn eftir fyrrverandi landsstýrismenn.

**7. petti.** Samsýning, borðfæ og eftirløn verða goldin frammanundan við 1/12 um mánaðin.

**8. petti.** Borgarstjóri fær ikki fundar- og aðrar samsýningar sbrt. § 9,6 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

**9. petti.** 1. varaborgarstjóri fær eina árliga samsýning uppá 10% av samsýningi, ið verður givin borgarstjóranum, jfr. § 10, stk. 2, í kunngerð um samsýning v.m sambært kommunustýrislógini.

**10. petti.** Árlig føst fundarsamsýning til lim í býráðnum er 48 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerð um samsýning v.m sambært kommunustýrislógini.

**<u>11. petti</u>.** Árliga fasta samsýningin til formenn í byggi- og býarskipanarnevndini, havnanevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini, sosialu nevnd og teknisku nevnd er 3 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, nr. 5, í kunngerðini um samsýning.

**<u>12. petti</u>.** Árliga fasta nevndarsamsýningin til býráðslim, sum er limur í einari av føstu nevndunum (byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini, havnanevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini, sosialu nevnd og teknisku nevnd) er 12 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini um samsýning.

**<u>13. petti</u>.** Kommunustýrislimir, ið eru formenn ella nevndarlimir í øðrum nevndum, sum býráðið hevur valt tey í, fáa fundarsamsýning eftir reglunum í § 2, stk. 2, í kunngerðini um samsýning, er ikki annað ásett í aðrari lóg.

Kommunustýrislimir, ið eru formenn ella nevndarlimir í hesum nevndum, fáa tó eina árliga fasta samsýning á kr. 5.000,00:

1. staðbundnu nevndunum
2. brunanevndini
3. hýruvognsnevndini

**<u>14. petti</u>.** Samsýning verður goldin til og við endan á tí mánaði, tá viðkomandi ikki er í starvinum longur, ella at viðkomandi ikki hevur røkt starvið samanhangandi í 3 mánaðir, sbrt. § 17,1 í kunngerð um samsýning v.m sambært kommunustýrislógini. Er frávera grundað á sjúku, barnsburð, ella ættleiðing, hevur viðkomandi rætt til samsýning í upp til 6 mánaðir, sbrt. § 17,2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógina.

**<u>15. petti</u>.** Tiltakslimur fær samsýning sum býráðslimir ella nevndarlimir. Tiltakslimur fær tó einans lutfalsliga samsýning fyri tað tíðarskeið, hann fyribils er limur. Tiltakslimur, sum einans møtir á einstøkum fundi, fær tá fundarsamsýning sbrt. § 7, 1-2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógina.

**<u>16. petti</u>.** Onnur enn kommunustýrislimir fáa fundarpening fyri arbeiði í nevndum o.l., sum býráðið hevur valt tey í, eftir reglunum í § 9 í kunngerðini um samsýning.

**<u>17. petti</u>.** Býráðið og føstu nevndirnar kunnu taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m. bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

Borgarstjórin ferðast sambært egnari fíggjarætlan og kann góðkenna, at varamaður luttekur í hansara stað.

Verða ørindini samsýnt av øðrum, verður eingin samsýning latin frá býráðnum.

## 8. partur
## Broytingar í stýrisskipanini o.a.

### § 40

Henda kommunustýrisskipan og broytingar í henni skulu verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum, við minst 14 daga millumbili.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Vagnur Johannesen | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |